# Uppskot til innkeyps- og útboðspolitikk

**Vinnumálaráðið**

**januar 2011**

## Samandráttur

Land og kommunur keypa inn fyri yvir 2 mia. kr. á privata marknaðinum á hvørjum ári. Harumframt framleiðir tað almenna sjálvt nógvar tænastur og fer størsti parturin av rakstrarkostnaðinum í hesum sambandi til lønir. Tað er eyðsæð, at talan er um stórar upphæddir, og tað almenna má til eina og hvørja tíð kunna vísa á, at hesar skattakrónurnar eru nýttar við skynsemi og ábyrgd.  Tí eigur alment innkeyp at fara fram eftir nøkrum meginreglum, sum eru við at tryggja effektivitet, gjøgnumskygni og eins viðferð av veitarum í innkeypstilgongdini. Hesar meginreglur skulu taka støði í føroyskum viðurskiftum, vera smidligar og lættar at umsita hjá myndugleikum og lætt skilligar hjá vinnuni.

Ásannandi, at tørvur er á meira skipaðum viðurskiftum í sambandi við alment innkeyp, setti landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl, á heysti 2010 ein arbeiðsbólk at orða eitt uppskot til nýggjar innkeyps- og útboðsreglur. Arbeiðsbólkurin hevur savnað vitan og royndir um innkeyp og útboð í føroyskum høpi og hoyrt framløgur frá ymsum áhugafelagsskapum, fyritøkum og myndugleikum. Harumframt hevur bólkurin kannað, hvussu onnur lond kring okkum hava skipað hetta økið – og her hevur serliga verið dentur lagdur á smátjóðir, so sum Isle of Man, Áland, Ísland og Hetland og eisini kommunur í nakað størri londum. Niðurstøðan hjá bólkinum er, at tað er tørvur á einum innkeyps- og útboðspolitikki og nýggjar lógarreglur fyri útbjóðingar.

Ætlanin er, at innkeyps og útboðspolitikkurin skal vera galdandi fyri land og kommunur. Á henda hátt eru somu reglur galdandi fyri alt tað almenna innkeypið. Kommunurnar hava játtað at geva eina afturmelding um, hvørt  tær vilja taka undir við einum felags almennum innkeyps- og útboðspolitikki. Henda afturmelding fæst væntandi í byrjanini av 2011. Frávelja kommunurnar innkeyps- og útboðspolitikkin hjá landinum, verður teimum álagt í lóg at gera innkeyps- og útboðspolitikk hvør sær. Viðmerkjast skal eisini, at fleiri av tilmælunum í innkeyps- og útboðspoltikkinum verða ætlandi lógarásett tá nýggj útboðslóg er liðug, og at henda eftir ætlan kemur at fevna um kommunurnar eisini.

**Innkeyps- og útboðspoltikkurin**
Hetta skjalið er úrslit av arbeiðinum higartil í arbeiðsbólkinum og er talan um ein innkeyps- og útboðspolitikk fyri tí almenna. Skjalið er býtt í tveir høvuðspartar 1) innkeypspolitikk og 2) útboðspolitikk.

1) Innkeypspolitikkurin ásetir tær meginreglur, sum skulu vera galdandi, fyri tær veitingar, sum tað almenna keypir frá privatum veitarum, sama hvør innkeypsháttur verður nýttur.

2) Útboðspolitikkurin ásetir, nær veitingar skulu verða bjóðaðar út millum privatar veitarar, og ásetir harumframt tær mannagongdir, sum skulu verða nýttar í útbjóðingunum[1]. Útboðspolitikkurin er býttur í tveir høvuðspartar, sum í høvuðsheitum snúgva seg um a) kappingarútsetan og b) útbjóðingarmannagongdirnar.
   a. Kappingarútsetan. Hesin partur snýr seg um, hvussu tað almenna á ein skipaðan hátt kann meta um,, hvørt ávísar uppgávur eiga at verða bjóðaðarút, sama um hesar áður eru keyptar frá privatum veitarum ella ikki.
   b. Útbjóðingarmannagongdir. Hesin partur snýr seg um mannagongdir í sambandi við útbjóðing.

Nú innkeyps- og útboðspolitikkurin verður sendur til ummælis arbeiðir bólkurin víðari við:

- Nýggari útboðslóg
- Ætlan fyri gagnnýtslu av innkeyps- og útboðsførleikum, sum eru innan tað almenna
- At menna eina útboðsheimasíðu

Hesi arbeiði verða væntandi liðug á heysti 2011.

**Endamálið og mál við innkeyps- og útboðspolitikkinum**
Yvirskipaða endamálið við at orða og seta í verk ein innkeyps- og útboðspolitikk fyri tað almenna er, at almenna tilfeingið verður nýtt so effektivt sum gjørligt. Hetta yvirskipaða mál kann útgreinast soleiðis:.

Mál 1: *At uppgávurnar hjá tí almenna verða kappingarútsettar í tann mun, tað er skynsamt.* Ætlanin við hesum málinum er, at tað almenna skal útseta uppgávur fyri kapping, har tað er skynsamt. At útseta uppgávur fyri kapping inniber, at tað almenna kannar um ítøkiligar uppgávur kunnu loysast fyri minni kostnað við at bjóða tær út í kapping millum privatar veitarar. Hetta antin tá talan er um uppgávur, sum frammanundan verða loystar av starvsfólki hjá tí almenna, ella uttanhýsis uppgávur.

Mál 2: *At vøksturin og effektiviteturin í privata geiranum verður stimbraður*
Um tað eydnast at skaparstørri kapping um uppgávurnar, sum tað almenna eftirspyr, verður eisini ein størri tileggjan til effektivisering í privata geiranum. Øktur produktivitetur í privata geiranum er grundarlag undir framhaldandi vøkstri, tí hetta merkir, at størri virði verður framleitt fyri hvønn framleiðslufaktor (arbeiðsmegi, realfæ). Harumframt kann ein meira miðvís gjøgnumgongd av almennu uppgávunum viðføra, at fleiri uppgávur hjá tí almenna verða bjóðaðar út og kann hetta føra til vøkstur í privata geiranum..

Mál 3: *At privatar fyritøkur fáa javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram til at loysa uppgávur fyri tað almenna*

[1] Serlig lógarregulering er galdandi fyri útbjóðing í sambandi við byggivirksemi, og útboðspolitikkurin skal takast við avísum fyrivarni, tá tað snýr seg um byggivirksemi. Serligur arbeiðsbólkur arbeiðir við at endurskoða reglurnar á hesum øki.

Í hesum málinum liggur tann hugsjónin, at fyritøkur skulu hava ein veruligan møguleika at bjóða seg fram. Sostatt hevur tað almenna skyldu at lýsa alment, tá talan er um útbjóðingar og at biðja um fleiri framíhjáboð, tá talan er um smærri uppgávur.

**Meginreglur fyri almennum innkeypi**

Endamálið við hesum meginreglum er, at tær skulu vera grundarlag undir øllum innkeypi hjá tí almenna. Tær skulu sostatt virka sum yvirskipaðar reglur, sum eru grundarlag undir reglum, vegleiðingum og mannagongdum, sum verða nýttar í almennum innkeypi. Hesar meginreglur eru lýstar niðanfyri.

*Virði fyri pening*

Grundhugsjónin í almennum innkeypi skal vera virði fyri pening. Tilfeingið hjá tí almenna skal umsitast á so skynsaman hátt sum møguligt, har mest virði fæst í almennum innkeypi. Tað merkir at, tað almenna velur tær loysnir, har mest virði fæst fyri peningin. Hetta kann t.d. gerast við:

- at nágreinilig krøv eru tilskilað í kravfestingini soleiðis, at skikkaður veitari verður valdur út frá prísi
- at veitari verður valdur út frá, hvør kann veita mest virði innan ein givnan fíggjarkarm
- at veitari verður valdur út frá einari samlaðari meting av prísi og øðrum viðurskiftum(t.d. dygd, royndir, tænasta og veitingartreytir).

*Gjøgnumskygni*

Mannagongdir í sambandi við alment innkeyp skulu verða gjøgnumskygdar. Fyritøkur, borgarar og onnur skulu hava álit á, at almenn innkeyp eru ópartísk, rættvís, saklig og sýna opinleika. Tað merkir, at:

- avgerðir um at keypa inn/bjóða út á privata marknaðinum fara fram eftir alment ásettum leisti,
- eitt dygdargott arbeiði er gjørt bæði í útbjóðingartilfari og fyri at eyðmerkja møguligar veitarar (um keypt verður inn uttan útboð),
- viðgerðin av veitarum er eins, og
- opinleiki er um avgerðina og grundgevingar fyri val av veitara eru haldgóðar.

*At fremja virkna kapping*

Grundreglur um virkna kapping eru partur av almenna innkeypspolitikkinum, eins og tær eru grundleggjandi í vinnupolitikkinum. Virkin kapping er ein fortreyt fyri, at marknaðurin verður effektivur og kappingarførur. Sostatt er tað umráðandi, at tað almenna er við til at undirbyggja hetta og ikki við sínum innkeypi er viðvrikandi til at minka um kappingina á marknaðinum.

**Tilmæli í almennum innkeypi og til innkeypshættum**

Niðanfyri eru høvuðstilmæli í innkeypspolitikkinum. Nøkur av hesum viðurskiftum vera eftir ætlan í uppskoti til útboðslóg, sum verður klár í 2011. Allar upphæddir eru *uttan* MVG

- Keyp úr kr. 50.000 upp í kr. 800.000: Minst tvey framíhjáboð (tilboð)
- Keyp úr kr. 800.000: Skulu bjóðast út, men við ávísum undantøkum[2]

[2] Undantøkini eru nærri lýst í punkt 1.7 í innkeyps- og útboðspolitikkinum

- Rammusáttmálar við virði yvir kr. 800.000 skulu bjóðast út
- Mál í útbjóðingartilfari skal vera føroyskt, umframt at annað viðkomandi mál kann nýtast, har bjóðað verður út uttanfyri Føroyar. Føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at lata inn tilboð á føroyskum.
- Har tað fremur kapping, ella á annan hátt kann vera gagnligt, kunnu almennir myndugleikar býta eina veiting upp í fleiribólkar. Fyritøkur kunnu tá bjóða seg fram at loysapartar av samlaðu uppgávuni. Útboð og innkeyp kunnu tí býtast upp, har tað er skynsamt. Tó skal samlaða útboðsvirðið vera tað sama. Tískil skulu útbjóðingar *ikki* býtast upp soleiðis, at talan verður um t.d. tvær veitingar á kr. 400.000 fyri at umgangast skal einari útbjóðing. Heldur er ætlanin, at í útbjóðingar-tilgongdini skal umhugsast, hvussu vøru/tænas*tubý*tið er sett saman. Hetta skal skiljast so, at har tað er gott fyri kappingina á marknaðinum, kunnu uppgávur bjóðast út við tí fyriliti, at meira enn ein fyritøka vinnur uppgávuna. Tað merkir so, at útbjóðingar kunnu býtast upp í fleiri vetiingar, so fleiri fyritøkur (eisini smærri) vinna sáttmála. Sostatt er ætlanin, at uppgávur skulu, har tað er ráðiligt og skynsamt (t.v.s. effektivt), býtast upp í útbjóðingartilfarinum á til dømis:
    - Vørubólkar: Heldur enn at samla allar vørur undir ein bólk, kunnu vørur býtast upp á nakrar bólkar við tí fyri e*yga,* at fyritøkur kunnu bjóða upp á antin allar vørubólkar ella úrvaldar vørubólkar.
    - Landafrøðiligt øki: Her kann veiting vera býtt upp í útbjóðingartilfarinum eftir landafrøðiligt øki, har fyritøkur kunnu bjóða upp á at veita til øll øki ella úrvald øki.
    - Tíð: Til ber at býta uppgávur upp í veitingar innan t.d. vanliga skrivstovutíð og uttanfyri vanliga skrivstovutíð.

## Útboðspolitikkurin

**Kappingarútsetan**

Ein stór broyting í útboðspolitikkinum í mun til galdandi reglur er, at krøv verða sett til myndugleikar um at eftirkanna alt virksemi hjá sær fyri at gera metingar um, hvørjar uppgávur eiga at verða bodnar út. Henda kappingarútsetan inniber, at tað almenna velur at útseta innanhýsis uppgávur fyri kapping frá tí privata. Um kappingin vísir, at tað privata meira effektivt kann framleiða tænastuna ella vøruna í mun til tað almenna sjálvt, verður sáttmáli gjørdur við privatan veitara.. Myndugleikar skulu tí gjøgnumganga sínar uppgávur í minsta lagi 4. hvørt ár og gera metingar um, hvørjar uppgávur eiga at verða kappingarútsettar. Úrslitið av gjøgnumgongdini skal almannakunngerast.

**Útbjóðingartilgongdin**

*Útboðsformar*

Í høvuðsheitum eru tríggir útboðsformar, hóast hesi kunnu hvør sær býtast upp í fleiri undirbólkar. Útboðsformarnir er:

- Alment útboð. Allir áhugaðir partar kunnu geva eitt tilboð.
- Avmarkað útboð. Avmarkaður skari gevur eitt tilboð - ofta eftir einari undangóðkenning.
- Kappingarkend samrøða. Myndugleikin hevur samrøður við møguligar veitarar og velur grundað á samrøðurnar nakrar út,, sum kunnu geva tilboð upp á uppgávuna.

Sum meginregla verður mælt til at nýta alment útboð ella avmarkað útboð við almennari undangóðkenning. Almenn undangóðkenning inniber almenna lýsing um, at fyritøkur kunnu søkja um undangóðkenning.

*Metingarstøði og eins viðferð*
Fyri at betra um gjøgnumskygnið, verður í politikkinum lagt upp til, at tað verður fráboðað teimum, ið bjóða, hvørji metingarstøði tilboðini verða mett eftir, tá avgerðin um undangóðkenning ella tillutan av sáttmála skal takast. Metingarstøðini eiga at vera vektað og skal vektingin upplýsast í útbjóðingartilfarinum.
Tá veitari skal veljast skulu øll hava eins viðferð. Tað merkir m.a., at

- Har spurningar eru um útbjóðingartilfarið, eiga allir veitarar fáa útflýggjað upplýsingar, sum verða latnir út til ávísan tilboðsgevara. Annar møguleiki er at skipa fyri almennum fundi, har tilboðsgevarar kunnu seta spurningar/fáa greiðu á viðurskiftum í útbjóðingartilfarinum.
- Evstamark fyri at lata inn tilboð verður yvirhildið og tey tilboð, sum eru ov sein, eiga at verða burturvíst. Hetta er umráðandi fyri at meginreglan um eins viðferð av veitarum verður hildin.
- Treytirnar, sum eru settar í útbjóðingartilfarinum, skulu yvirhaldast.
- Tilboð eru afturlatin og eru í trúnaði til freistin er farin.

# 0. Innkeyps- og útboðspolitikk

## 0.1 Inngangur

Í 2009 keypti landið vørur og tænastur fyri 1,1 mia. kr., umframt at íløgur vórðu gjørdar fyri 184 mió. kr. Kommunurnar keyptu inn fyri yvir 400 mió kr. í vørum og tænastum og gjørdi harumframt íløgur fyri áleið 375 mió kr. Leggja vit hesi hagtøl saman, er talan um alment innkeyp fyri yvir 2 mia. kr. um árið Tað er eyðsæð, at her er talan um stórar upphæddir og sum ein stórur innkeypari er tað týdningarmikið og neyðugt, at tað almenna sýnir skynsemi og ábyrgd. Ábyrgd fyri at umsita skattapengar skilagott, ábyrgd fyri gjøgnumskygni og partloysi í innkeypstilgongdini og ábyrgd fyri at stimbra kappingina á teimum marknaðum, har tað almenna virkar sum innkeypari.

Innkeyps- og útboðspolitikkurin er ein byrjan til at skipa almenna innkeypið, harímillum eisini útbjóðingar[3]. Arbeitt verður nú við einari nýggjari útboðslóg og er ætlanin at lógarfesta part av teimum meginreglunum, sum eru í politikkinum (sí part 1.5 og 1.7). Hóast talan er um at fáa skipað økið, eisini við lóggávu, er talan um at fáa eina smidliga skipan fyri brúkarar t.v.s. vinnuna og myndugleikar. Sostatt er talan um, at eitt skipað alment innkeyp skal vera til gagns fyri allar partar uttan at vera bureaukratisk.

Søguliga sæð hevur alment innkeyp verið óskipað og er tað bert á tryggingar-, byggi- og annleggsøkinum, at reglur eru galdandi. Í 1985 kom í gildi løgtingslóg um útbjóðing (licitatiónslógin) fyri veitingar innan byggivirksemi. Eitt av høvuðsendamálunum við útbjóðingarlógini var at fremja kapping á privata byggimarknaðinum og hevur byggivinnan víst á, at samanumtikið hava reglurnar roynst væl. Tó so, fellur tað mesta av almennum innkeypi uttanfyri útbjóðingarlógina og hava almennir innkeyparar og privatir veitarar tá ongar veruligar reglur um innkeyp at halda seg til.

| Endamálið við innkeyps- og útboðspolitikkinum |
|---|
| *Yvirskipaða endamálið við at orða og seta í verk ein innkeyps- og útboðspolitikk fyri tað almenna er, at tilfeingið verður nýtt so effektivt sum til ber.* |

At tilfeingið verður nýtt effektivt inniber, at uppgávurnar hja tí serliga, at tað verður roynt at fáa munadygga kapping um uppgávurnar, har tað er gjørligt. Harumframt er neyðugt at tryggja, at mannagongdirnar í sambandi við alment innkeyp virka fyri, at fyritøkur hava somu møguleikar at bjóða upp á uppgávur.Við hesum í huga eru niðanfyrinevndu mál sett fyri innkeyps- og útboðspolitikkinum.

[3] Fyri tær uppgávur har útboðslógin (licitatiónslógin) er galdandi er tað altíð lógin, sum hevur yvirvág í mun til innkeyps- og útboðspolitikkinum. Hetta er serliga galdandi í teimum førum, har innkeyps- og útboðspolitikkurin kann vera í stríð við útboðslógini.

Mál fyri innkeyps- og útboðspolitikkin
1. At vøksturin og effektiviteturin í privata geiranum verður stimbraður
2. At privatar fyritøkur fáa javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram at loysa uppgávur fyri tað almenna
3. At uppgávurnar hjá tí almenna verða kappingarútsettar í tann mun, tað er skynsamt og effektivt

Mál 1: *At vøksturin og effektiviteturin í privata geiranum verður stimbraður*
Við at tað almenna setur sum mál at loysa uppgávunar so effektivt sum møguligt kann tað væntast, at ein natúrlig avleiðing er, at kappingin í privata geirinum økist, og at uppgávurnar tí verða loystar meira effektivt . Øktur effektivitetur er grundarsteinurin undir búskaparvøkstri. Harumframt kann eitt økt fokus á, hvussu tað almenna mest effektivt fær vørur og tænastur til vega, føra til at tað í størri mun verður kannað um tað privata kann framleiða vørur og tænastur effektivari enn tað almenna.

Mál 2: *At privatar fyritøkur fáa javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram til at loysa uppgávur fyri tað almenna*
Í hesum málinum liggur tann hugsjónin, at fyritøkur skulu hava ein veruligan møguleika at bjóða seg fram undir somu fortreytum. Sostatt hevur tað almenna skyldu at lýsa alment tá talan er um útbjóðingar og at biða um fleiri framíhjáboð, tá talan er um smærri uppgávur.

Mál 3: *At uppgávurnar hjá tí almenna verða kappingarútsettar í tann mun, tað er skynsamt og effektivt*
Ætlanin við hesum málinum er, at tað almenna skal útseta uppgávur fyri kapping, har tað er skynsamt og effektivt. At útseta uppgávur fyri kapping inniber, at tað almenna kannar um ítøkjuligar uppgávur kunnu loysast fyri minni kostnað við at bjóða hana út. Hetta antin tá talan er um innanhýsis uppgávur (t.v.s. tær, sum eru loystar av starvsfólki hjá tí almenna) ella uttanhýsis uppgávur, sum higartil ikki eru fingnar til vega í kapping millum fyritøkur.

*Ætlanin við innkeyps- og útboðspolitikkinum*
Tað er ein sannroynd, at Føroyar eru ein lítil marknaður og hetta hevur við sær, at fleiri marknaðir hava bert tveir ella í summum førum ein veitara. Hetta eigur tó ikki at vera ein forðing fyri at gera ein yvirskipaðan innkeyps- og útboðspolitikk fyri tað almenna. Heldur er ætlanin, at innkeyps- og útboðspolitikkurin skal vera ein grundhugsan um, hvørji atlit verða tikin, tá tað almenna keypir inn – ein grundhugsan, sum virkar sum eitt fast støði undir reglum og vegleiðingum í sambandi við alment innkeyp.

### 0.1.1 Arbeiðsbólkurin fyri innkeyps- og útboðsreglur: Høvuðsbólkur og serbólkur
Á heysti 2010 setti Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, ein arbeiðsbólk at orða og seta í verk ein innkeyps- og útboðspolitikk. Í arbeiðsbólkinum eru umboð fyri Vinnumálaráðið, Innlendismálaráðið, Kappingareftirlitið, Landsverk, Vinnuhúsið,

Fíggjamálaráðið, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag. Øll hava hesi havt eitt umboð hvør, tó undantikið Vinnumálaráðið, sum hevur havt tvey umboð (formann og skrivara).

Herumframt arbeiðir ein serbólkur ítøkiliga við reglunum á byggi- og annleggsøkinum. Mett varð, at galdandi reglur á byggi- og annleggsøkinum eru so mikið neyvar, væl grundfestar og royndirnar nógvar at nýta hesar reglur, at neyðugt var við einum serstøkum forumi at viðgera júst hetta økið. Í hesum bólkinum eru umboð fyri Føroya Handverksmeistarafelag, Ráðgevarafelagið, Byggiharrasamtakið og Vinnumálaráðið. Øll hesi hava havt eitt umboð hvør undantikið Vinnumálaráðið, sum hevur havt tvey umboð (formann og skrivara).

Arbeiðið hevur verið skipað soleiðis, at arbeiðsbólkurin hevur havt fundir aðru hvørja viku meðan serbólkurin hevur hitst nakrar ferðir og heldur arbeiðið fram, nú lógarsmíðið at gera nýggja útboðslóg fer í gongd. Í hesari tilgongdini hevur høvuðsarbeiðsbólkurin fingið íkast frá umboðum úr vinnulívinum, feløgunum og almennum/kommunalum aktørum. Harumframt hevur eisini verið kannað, hvussu onnur lond hava skipað seg í samband við alment innkeyp og útboð og hvørjar reglur eru galdandi. Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á at kanna innkeyps- og útboðsreglur í smátjóðum sum t.d. Isle of Man, Ísland, Hetland og Áland. Reglurnar í Danmark eru eisini nýttar sum íblástur, serliga skipanir fyri alment innkeyp og útboð hjá donskum kommunum.

Innkeyps- og útboðspolitikkurin er eitt uppskot frá arbeiðsbólkinum og tá politikkurin hevur verið til hoyringar, verður hann endaliga orðaður og lagt fyri landsstýrið til støðutakan.

**0.1.2 Bygnaðurin í innkeyps- og útboðspolitikkinum**

Innkeyps- og útboðspolitikkurin er býttur í tveir høvuðspartar: 1) innkeypspolitikk og 2) útboðspolitkk.

Fyrsti partur snýr seg um innkeypspolitikk í síni heild innan almenna geiran. Her verður núverandi støðan viðgjørd og grundleggjandi hugsjónirnar undir nýggja innkeypspolitikkinum eru orðaðar. Harumframt eru teir mest vanligu innkeypshættirnir umrøddir og tilmæli til innkeypshættir gjørd. Seinast í hesum parti verða almennir førleikar at keypa inn umrøddir.

Í øðrum parti, um útboðspoltikk, verður innkeyp gjøgnum útboð meira neyvt viðgjørt. Hesin partur er býttur upp í tveir yvirskipaðar partar, nevnliga kappingarútseting og útbjóðingartilgongd. Fyrsta evni, kappingarútseting, snýr seg um hvussu almennir myndugleikar kunnu taka støðu til, hvørjar uppgávur eiga at verða bodnar út og hvørji atlit skulu takast í hesari viðgerð. Næsta evni, útbjóðingartilgongdin, snýr seg um mannagongdir í samband við eina útbjóðing og lýsir t.d. nøkur av viðurskiftunum, sum hædd skal takast fyri í einari útbjóðing og hvat innihaldið í útbjóðingartilfarinum eigur at vera.

## 0.2 Hvør er umfataður av innkeyps- og útboðspolitikkinum

Tey, sum eru umfatað av innkeyps- og útboðspolitikkinum eru:

- Tey, sum reka virksemi, sum kemur undir játtanarsløgini rakstrarjáttan, løgujáttan og landsfyritøka í játtanarskipan landsins.
- Kommunur[4]

Tey, sum *ikki* eru umfatað av innkeyps- og útboðspolitikkinum, eru:

- Onnur feløg, sum eru meira óheft av almennu umsitingini, eitt nú almenn partafeløg og onnur, sum ikki fella undir omanfyrinevndu játtanarsløg.

[4] Kommunurnar fara at taka støðu til um tær vilja umfatast av innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá landinum. Frávelja tær hesa loysn verður teimum álagt í lóg at gera ein innkeyps- og útboðspolitikk. Kommunur vera tó umfata av eini útboðslóg.

# 1. Partur: Innkeypspolitikkur

## 1.1 Hvat er alment innkeyp?

Sum part av virkseminum og í sambandi við tænastuveitingar til borgaran, keypir tað almenna vørur og tænastur á privata marknaðinum. Hesi keyp umfata alt frá bíligum og lutfalsliga einføldum veitingum, sum t.d. skrivstovuamboð til meira truplar, kostnaðarmiklar og samansettar vørur/verkætlanir, sum t.d. bygging av einum skúla ella eina nýggj KT-skipan. Alment innkeyp er sostatt alt keyp hjá tí almenna av vørum og tænastum, sum ikki verða framleiddar í almenna geiranum. Innkeyp kann fara fram á ymsan hátt og er ofta tengt at slagi av keypi og hvussu stóra íløgu talan er um. Sum dømi um innkeypshættir kann nevnast útboð, hissini keyp, rammuavtalur og avbjóðingar. Hesi verða nærri umrødd seinni.

Fyri at tryggja sær, at almenn innkeyp eru skynsom (t.e. rætta vøran/tænastan verður keypt og at mest virði fæst fyri peningin), er tað neyðugt, at tað almenna hevur innkeypsførleikar. Sostatt er umráðandi, at tað almenna sýnir dugnaskap og ábyrgd í innkeypstilgongdini, bæði so at fyritøkur hava álit á innkeypsmannagongdunum og soleiðis, at peningur verður nýttur á skynsaman hátt.

Umframt at betra um innkeypsførleikar hjá tí almenna sum heild, er tað eisini neyðugt við serkunnleika um teir ymsu innkeypshættirnar, eitt nú almennar útbjóðingar, sum kunnu vera sera orkukrevjandi fyri tilboðsveitarar. Samanumtikið er tað tó neyðugt, at tað almenna hevur førleikar at tillaga innkeypsmannagongdina eftir hvør vøra/tænasta verður keypt og eftir bygnaðinum á teimum ymsu marknaðunum.

Ætlanin er tí, at innkeyps- og útboðspolitikkurin, saman við lógini og vegleiðingar á økinum, skulu gera tilgongdina greiðari og virka sum ein hjálp hjá almennum innkeyparum.

## 1.2 Hagtøl um alment innkeyp

Tað almenna keypur eina víðfevnandi røð av vørum, tænastum og byggiuppgávum. Tað eru eisini serlig viðurskifti, sum gera seg galdandi fyri nógvar vørur og tænastur, sum tað almenna í Føroyum keypir nógv av. Hetta stendst av, at talan ofta er um keyp, har tað bert eru ein ella tveir útbjóðarar á føroyska marknaðinum, t.d. ferðaseðlar, olja, el, og telefoni. Sostatt kann kappingin á fleiri marknaðum vera avmarkað ella als ikki til staðar.

Talva 1 vísir árligu rakstrarútreiðslurnar hjá landinum[5] frá 2007 til 2011. Árligu rakstrarútreiðslurnar hjá landinum hava í miðal verið 3,3 mia. kr. hesi árini. 64% av árligu rakstrarútreiðslunum fara til lønir, meðan restin fer til keyp av vørum og tænastum.

[5] Almenni raksturin fevnir eisini um kommunurnar, men Fíggjarmálaráðið hevur ikki enn eina endaliga skipan sum kann útgreina rakstrartølini hjá kommununum. Tí verður bert raksturin hjá landinum lýstur.

**Talva 1: Rakstrarútreiðslur hjá landinum, 2007 til 2011**

| *Mió. kr.* | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Miðal | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 3.079 | 3.331 | 3.342 | 3.407 | 3.409 | 3.314 | 100 |
| -Lønir v.m. | 1.893 | 2.036 | 2.120 | 2.250 | 2.258 | 2.111 | 64 |
| -Keyp av vørum & tænastum | 970 | 1.071 | 1.024 | 972 | 988 | 1.005 | 30 |
| -Keyp av útbúnaði, netto | 104 | 104 | 79 | 86 | 79 | 90 | 3 |
| -Leiga, viðlíkahald og skattur | 98 | 107 | 114 | 92 | 78 | 98 | 3 |
| -Avskrivingar o.a. | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 |
| -Ymsar rakstrarútreiðslur | 13 | 11 | 4 | 6 | 5 | 8 | 0 |

*Viðm. tølini fyri 2010 eru ikki endalig, og tølini fyri 2011 eru úr fíggjarlógaruppskotinum 2011.*

Afturat rakstrinum koma árligu íløguútreiðslurnar hesi árini, sí talvu 2. Íløgur eru størri verkætlanir, sum vanliga strekkja seg yvir fleiri ár, og er meginparturin av íløgunum innan byggi- og verklagsøkið. Talan er serliga um bygningar, skip, vegagerðir og aðrar verkætlanir hjá Landsverki.

**Talva 2: Løguútreiðslur hjá landinum, 2007 til 2011**

| *Mió. kr.* | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Íløguútreiðslur | 288 | 228 | 188 | 176 | 209 | 218 |

*Viðm. tølini fyri 2010 eru ikki endalig, og tølini fyri 2011 eru úr fíggjarlógaruppskotinum 2011.*

Íløguverkætlanirnar skulu tí játtast við serligari verklagslóg, umframt játtanina á løgtingsfíggjarlógini. Einstøku íløguverkætlanirnar kunnu tí í summum førum kosta fleiri hundrað milliónir, hóast árligu íløguútreiðslurnar á løgtingsfíggjarlógini ikki eru líka stórar.

### 1.2.1 Býti av dagliga keypinum hjá landinum

Í 2009 keypti landið fyri góða 1,1 mia. kr. í vørum og tænastum. Talva 3 vísir, hvørjar vørur og tænastur landið keypti fyri hesar pengar. Niðanfyri verður greitt frá nøkrum serligum viðurskiftum, ið eru galdandi fyri innkeypinum og marknaðunum, har landið keypir vørur og tænastur.

**Talva 3: Landsins keyp av vørum og tænastum í 2009 (kr.)**

| Keyp av vørum, tænastum og útbúnaði tilsamans | | 1.102.825.074 |
|---|---|---|
| Vørur og tænastu tilsamans | | 1.024.049.584 |
| Ferðing | | 62.142.109 |
| *- Ferðing og flutningur alment sett innanlands* | *8.527.257* | |
| *- Ferðing og flutningur alment sett uttanlands* | *24.004.794* | |
| *- Ferðing og flutningur onnur* | *29.610.058* | |
| Umboðan | | 8.715.700 |
| Matur og drykkivørur | | 25.209.851 |

| | | |
|---|---|---|
| El | | 19.915.814 |
| Olja | | 55.979.279 |
| *- Olja til hiting* | *19.878.924* | |
| *- Olja til flutning* | *36.100.355* | |
| Keyp av vørum/tilfari til víðari sølu | | 166.223.159 |
| Keyp av vørum/tilfari til víðari sølu punktgjøld v.m. | | 84.295.805 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | | 3.439.485 |
| Keyp av vørum annars | | 158.884.041 |
| Telefon | | 16.416.579 |
| Postgjøld | | 6.603.959 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | | 8.406.483 |
| Trygging | | 10.344.407 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kt | | 60.557.345 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | | 329.548.651 |
| Keyp av vørum og tænastum frá kommunum | | 7.366.917 |
| | | |
| **Útbúnaður tilsamans** | | **78.775.490** |
| Flutningsútbúnaður | | 6.860.918 |
| Telduútbúnaður og edv-menning | | 35.083.319 |
| Skrivstovuútbúnaður | | 1.450.645 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | | 36.060.380 |
| Tryggingarendurgjøld | | -374.427 |
| Søla av brúktum flutningsútbúnaði | | -234.000 |
| Søla av brúktum skrivstovuútb., maskinum, innbúgvi o.ø. | | -71.345 |

- Keyp av vørum til víðari sølu eru vørurnar, sum Apoteksverkið (166 mió. kr.) og Rúsan (84 mió. kr.) keypa at selja víðari í vinnuligari sølu, í alt 251 mió. kr.
- Ferðing og flutningur fevna um starvsfólk hjá landinum og sjúklingaflutning til serviðgerð uttanlands. Her er bert ein veitari á marknaðinum millum Føroyar og Danmark og millum oyggjarnar innanlands, 62 mió. kr.
- Á elmarknaðinum er ein veitari á marknaðinum. 20 mió. kr.
- Á oljumarknaðinum eru tveir stórir veitarar á marknaðinum, 56 mió. kr.
- Á telemarknaðinum eru tveir stórir veitarar á marknaðinum, 16 mió. kr.
- Á postmarknaðinum er ein veitari innan brævasendingar. 7 mió. kr.
- Á tryggingarmarknaðinum eru tveir veitarar, men her eru útboðsreglur ásettar í *Tryggingarrundskrivi landsins,* 10 mió. kr. (Áðrenn tryggingarrundskrivið kom í gildi, vóru árligu tryggingarútreiðslurnar hjá landinum um 17 mió. kr.)

Í 2009 hevur landið sostatt brúkt 442 mió. kr. av 1,1 mia. kr. til at keypa vørur at selja víðari, og at keypa vørur og tænastur á marknaðum, har tað bert er ein, tveir ella heilt fáir veitarar. Eftir eru sostatt góðar 660 mió. kr. at keypa vørur og tænastur á marknaðum, har tað er størri kapping. Hetta tal skal tó takast við fyrivarni, tí tveir ættiliga stórir postar eru keyp av vørum og tænastum annars, í alt 489 mió. kr. í 2009. Partar av hesum keypinum kunnu allarhelst skrásetast undir mono- og duopolmarknaðunum omanfyri. Nú er 2009 tikið sum

dømi, men býtið av vøru- og tænastukeypinum hjá landinum broytist ikki stórvegis frá ári til ár.

Omanfyri fáa vit innlit í, hvussu landið keypir inn (hesi tøl umfata ikki kommunala innkeypið) og hvørjar vørur/tænastur peningurin er nýttur til. Her er tað serliga merkisvert, at tað er eitt innkeyp uppá góðar 600 mió. kr., har økt kapping og meira skynsamt innkeyp kunnu skapa sparingar, hóast tað eru partar av hesari upphædd, sum í forvegin verða bjóðað út. Harumframt framleiðir tað almenna sjálvt tænastur fyri ein kostnað uppá oamnfyri 2 mia. Kr. Partur av hesari framleiðslu kann sannlíkt kappingarútsetast og hava eina effektivisering við sær.

| |
|---|
| Um landið nýtir hesar 600 mió. kr. bert 5% meira skynsamt er talan um eina sparing uppá 30 mió. kr. um árið |

## 1.3 Verandi skipan av almennum innkeypi

Hyggja vit eftir almenna innkeypinum í dag er tað bara tvey øki, sum eru skipað við reglum. Hetta eru tryggingarviðurskiftini hjá landinum og byggi- og annleggsøkið, sum ávíkavist eru umfataði av tryggingarrundskrivi landsins og av løgtingslógini um útbjóðing[6].

Tað er ein sannroynd, at vit í Føroyum hava lutfalsliga drúgvar royndir við byggi- og annleggsarbeiði og í tílíkum verkætlanum er ofta talan um lutfalsliga stórar peningaupphæddir. Allarhelst er hetta orsøkin til, at júst hetta økið er betur skipað, enn tá talan er um onnur innkeyp..

Hóast tað eru fáar ítøkiligar ásetingar um alment innkeyp eru nakrar yvirskipaðar reglur, sum kunnu útleiðast av generellum lógum (t.d. fyrisitingarlógini) og dómaraskaptum rættargrundsetningum. Tær týdningarmiklastu í innkeypshøpi eru:

- Saklig atlit: Hetta merkir, at avgerðir hjá tí almenna skulu vera grundaðar á saklig metingarstøði.
- Peningur hjá tí almenna skal brúkast skynsamt og á best møguligan hátt: Hetta merkir, at mest virði skal fáast fyri pengarnar hjá tí almenna.
- Prinsippið um eins viðferð: Hetta inniber eitt krav um somu kor og umstøður, sum skulu nýtast ópartískt mótvegis teimum fyritøkum, sum ætla at bjóða ella hava bjóðað upp á eina uppgávu hjá tí almenna. Sostatt kunnu almennir myndugleikar ikki handfara eins umstøður ymiskt uttan so, at tað eru sakligar orsøkir til tess.

Í flestu londum kring okkum eru ásetingar um hvørjar uppgávur skulu bjóðast út, tað veri seg við almennari útbjóðing ella avmarkaðum útboði. Tílíkar ásetingar eru í flestu førum grundaðar á kostnaðir fyri verkætlanina/veitingina, ið er avgerandi fyri, um ein uppgáva skal bjóðast út. Tey lond, sum eru umfatað av ES-reglum, hava greiðar ásetingar um, nær ein almenn uppgáva skal bjóðast út og undir hvørjum fortreytum.

[6] Ll. Nr. 106 frá 15. November 1984 um útbjóðing v.m.

Í Føroyum hava vit ikki nøkur hagtøl fyri hvussu keypt verður inn. Tað er tí trupult at meta um, í hvønn mun uppgávur verða bodnar út, men afturmeldingar frá kommunum geva ábendingar um, at fleiri kommunur hava innkeypsreglur og mannagongdir í onkrum líki, skrivað ella óskrivað. Tá talan er um innkeypssamstarv er helst lítið av innkeypi, har stovnar/myndugleikar samstarva sínámillum í sambandi við innkeyp/útbjóðingar, hóast nakrar kommunur samskipa innkeypið hjá sær til teir kommunalu stovnarnar. Tílík samstørv kunnu hava til endamáls at minka um kostnaðin og/ella læra hvør av øðrum.

Sum liður í arbeiðinum at gera ein innkeyps- og útboðspolitikk, hevur arbeiðsbólkurin havt samrøður við ymsar bólkar, bæði frá privata og almenna geiranum. Tað, sum hevur gingið aftur í fleiri av samrøðunum er, at tey, ið keypa inn fyri tað almenna sum heild ikki eru nóg serkøn/servand, tá tey keypa inn. Hesar afturmeldingar hava m.a. snúð seg um:

- Gjøgnumskygni: Tað skal vera møguligt og lætt at skilja innkeypstilgongdina. T.v.s. hvussu verður boðið út, hvat verður væntað av tilboðsgevarum og hvussu og hví verður ein veitari valdur fram um annan. Hetta krevur, at almenni myndugleikin er greiður, ópartískur og opin.
- Førleikar og fyrireiking: Fleiri afturmeldingar hava víst á, at førleikar hjá almennum innkeyparum eiga at betrast. Við hesum hevur serliga verið sipað til útbjóðingartilfar, sum viðhvørt hevur verið ógreitt, ófullfíggjað og sett órealisktiskar treytir til veitarar. Harumframt hevur ofta verið ov illa umhugsað, hvørji metingarstøði verða nýtt í avgerðini um, hvør veitari vinnur sáttmálan. Atfinningarnar, sum hava verið førdar fram, kunnu vera tengdar bæði at vantandi førleikum í sambandi við innkeyp sum heild, men harafturat hava innkeyparar ofta ov avmarkaða vitan um ta vøruna, tey keypa.

Í innkeypstilgongdini hevur eisini verið fýlst á vantandi fyrireiking frá almennari síðu, t.v.s., at innkeyp sum heild eru ov illa umhugsað frammanundan, t.d. hevur verið víst á, at tað almenna ofta manglar eina grundleggjandi vitan um, hvussu bygnaðurin er á marknaðinum, tey venda sær til. Harafturat er útbjóðingartilfar ofta ógreitt, hevur manglar og sum heild ov illa gjøgnumarbeitt.

Afturmeldingar frá vinnuni vísa á, at tað er umráðandi, at tað almenna

- Ger innkeypstilgongdina greiða og skilliga fyri vinnuni.
- Sýnir eins viðferð av tilboðsveitarum, so øll viðkomandi fáa høvi at bjóða uppá eina uppgávu.
- Tryggjar sær, at útbjóðingartilfarið er greitt og fullfíggjað. Harumframt, skal tað verða lætt hjá tilboðsveitarum at gjøgnumskáa hvørji metingarstøði verða nýtt í val av veitara.
- Eigur at hava grundleggjandi vitan um bygnaðin á tí marknaði tey venda sær til.

Sum nevnt omanfyri er tað sera avmarkað, hvørji øki eru skipað tá vit hugsa um alment innkeyp. Tað er serliga á byggi- og annleggsøkinum, at lóggáva leingi hevur verið galdandi, sum skipar viðurskifti í útbjóðingum. Harumframt hevur byggivinnan gjørt reglur har byggiharrar og arbeiðstakarar hava gjørt avtalu um hvussu ymisk viðurskifti skulu skipast (sí t.d. ABF 06). Í løgtingslógini um útbjóðing eru ásetingar um krøv og mannagongdir í sambandi við byggiverkætlanir, sum verða bodnar út.

### 1.3.1 Føroyska lisitatiónslógin

Endamálið við lisitatiónslógini var partvíst at gera reglur, sum skuldu økja um kappingina í sambandi við lisitatiónir, m.a. eitt forboð ímóti at javna boð frammanundan. Hóast lisitatiónslógin sum heild økti um møguleikar fyri kapping í mun til galdandi praksis, vóru fleiri kappingaravmarkandi ásetingar eisini settar í lógina. Í forarbeiðinum til donsku lógina, sum er nýtt sum fyrimynd fyri galdandi føroysku lógini varð beinleiðis skrivað, at tað "ud fra almene hensyn kunne være rimeligt at mildne konkurrencen inden for bygge- og anlægsvirksomhed". Dømi um hetta er m.a. ein áseting, sum hevur við sær, at byggiharri í mesta lagi kann biðja um tvey framíhjáboð upp á eina veiting.

Í 2001 avloysti nýggj lóg, tilbudsloven, táverandi donsku lisitatiónslógina. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um tilboðslógina varð tørvurin á nýggjari lóg grundgivin við, at tað vóru nakrar kappingaravmarkingar í galdandi lóg, sum ikki vóru í tráð við endamálið við kappingarlógini, t.e. at fremja skilagóða nýtslu av samfelagstilfeinginum gjøgnum virkna kapping. Hóast føroyska lisitatiónslógin var ein avskrift av táverandi donsku lisitatiónslóg, er føroyska lógin ikki broytt í tráð við tilboðslógina frá 2001 og ei heldur uppaftur nýggjaru donsku tilboðslógirnar frá 2005 og 2007. Tískil er tað framvegis ein avskrift av gomlum donskum reglum, sum er galdandi í Føroyum, og gomlu kappingaravmarkingarnar eru framvegis galdandi.

Ein neyvari lýsing av einstøku greinunum í føroysku lógini eru at finna í viðhefta skjali 1.

## 1.4 Lýsing av ymiskum innkeypshættum

Tá talan er um almenn innkeyp, verða fleiri innkeypshættir nýttir. Hvussu ein myndugleiki velur at keypa inn, er tengt at fleiri viðurskiftum, eitt nú hvør vøra/tænasta skal keypast, hvussu stóra upphædd talan er um, hvussu nógvar fyritøkur eru á marknaðinum og um vøran/tænastan javnan ella afturvendandi verður keypt. Teir mest vanligu innkeypshættirnir verða nú umrøddir.

### 1.4.1 Hissini keyp

Tá vit tosa um hissini keyp, er talan vanliga um smærri keyp, sum kosta lutfalsliga lítið, eitt nú keyp av kaffi ella skrivstovulutum. Í summum førum er eisini talan um vørur/tænastur, sum verða keypt heldur sjáldan, t.d. smærri amboð, forrit ella ein blaðlýsing. Vanliga verður ikki nógv orka løgd í tílík keyp og eru hesi ofta vanakeyp. Innkeypsmannagongdin er sostatt eyðmerkt av, at lutfalsliga avmarkað vitan verður fingin til vega um vøruna, umframt at keypt verður ofta uttan at kanna, hvat fæst á marknaðinum. Sostatt er talan um ein innkeypsform, sum er merktur av at eingin kapping er um vøruna/tænastuni. Hetta má eisini metast at vera ein mannagongd, sum kann góðtakast í førum, har talan er um smávegis keyp, so tíðin, ein almennur myndugleiki nýtir at keypa inn, samsvarar við virðið á keypinum.

Tó so er tað hugsandi, at tað eru fleiri keyp, sum fella undir hendan innkeypsháttin, enn ráðiligt er. Her verður sipað til keyp, sum antin kosta lutfalsliga nógv ella keyp, sum eru heldur torskild, har myndugleikin eigur at leggja meira orku í at kanna, hvørjar veitingar kunnu fáast á marknaðinum og til hvønn prís. Eisini kann tað hugsast, at smærri, afturvendandi keyp kunnu effektiviserast, um annar innkeypsháttur verður nýttur.

### 1.4.2 Útboð[7]

Útboð kann í stuttum lýsast sum ein innkeypsformur, har tað almenna heitir á ein breiðan ella avmarkaðan skara um at geva eitt tilboð upp á eina ávísa uppgávu í kapping við onnur. Endamálið við útbjóðingum er, at fyritøkur hava javnbjóðis møguleika at bjóða upp á almenn innkeyp.

Útbjóðing kann gerast á ymsan hátt og ber viðhvørt í sær eina undangóðkenning av fyritøkum, serliga til stórar verkætlanir (prekvalifikatión). Sum innkeypsformur er útbjóðing sera útbreitt í flestu ídnaðarlondum og verður hesin formur nýttur til keyp av vørum og tænastum, byggi- og annleggsverkætlanum og almennum veitingarvirksemi (t.d. el, telefon, hita, vatn).

Fyri at tryggja fyritøkum javnbjóðis møguleika at bjóða upp á almenn innkeyp, seta flestu lond kring okkum krøv um útbjóðingar til viðurskifti, so sum:

- Krav, at uppgávur omanfyri eina ásetta upphædd skulu bjóðast út
- Innihald í útbjóðingartilfari (t.d. greið kunning um tað, ið uppgávan snýr seg um)
- Hvussu útbjóðing verður almannakunngjørd (t.d. hvussu og hvar skal lýsast)
- Mannagongd í sambandi við val av veitara (t.d. greið krøv í útbjóðingartilfari, greið metingarstøði, viðgerðin av tilboðum er almenn o.s.fr.)

Í Føroyum hava vit nakað av royndum við útbjóðingum, men er hetta serliga í sambandi við byggi- og annleggsverkætlanir. Sum áður umrøtt, eru nakrar reglur og siðvenjur (t.d. lóg um útbjóðing, ABF 06), tá talan er um júst tílíkar verkætlanir. Tó so verður mett, at tørvur er á at gera greiðari reglur um, nær ein uppgáva eigur at bjóðast út og hvussu farast skal fram í sambandi við útbjóðing av vørum og tænastuveitingum.

Í framløgum og afturmeldingunum, sum arbeiðsbólkinum hevur fingið frá kommunum, myndugleikum og vinnuni hava fleiri áheitanir verið um at , at nýggjar reglur eiga at vera liðiligar og her serliga tá talan er um annað virksemi enn byggi- og annleggsverkætlanir.

### 1.4.3 Rammuavtalur

Samanumtikið er ein rammuavtala ein sáttmáli millum veitara og innkeypara um keyp av vørum fyri ein ávísan prís í eina avmarkaða tíð. Ofta verða slíkir sáttmálar bodnir út. Sostatt er ein rammuavtala ikki ein innkeypsformur sum so, men er sjálvur sáttmálin, sum fastleggur ein prís fyri keyp av ávísum vørum/tænastum. Í einari rammuavtalu eru vanliga ikki krøv um, at ávísar nøgdir av einari vøru skulu verða keypt. Tílíkar avtalur eru serliga væl egnaðar, tá talan er um vørur og tænastur, sum verða keyptar við jøvnum millumbilum og í lutfalsliga stórum mongdum yvir tíð. Í høvuðsheitum eru tvey sløg av rammuavtalum. Hesi eru:

- Rammuavtala við *einum* veitara: Her er talan um eina avtalu um keyp av somu vøru frá einum veitara. Vanliga er keyparin bundin at keypa allar vørur/tænastur, sum avtalan fevnir um frá sama veitara.

[7] Útboð, m.a. teir ymisku útboðsformarnr, verður meira neyvt lýst í part 2, útboðspolitikkur.

- Rammuavtala við *fleiri* veitarum: Hetta slagið av rammuavtalu inniber, at keyparin hevur avtalu um keyp av samlíkum vørum og tænastum frá fleiri veitarum.

Hyggja vit eftir fyrimunum við rammuavtalum við *einum* veitara mótvegis *fleiri* veitarum kann sigast, at har talan er um ein veitara, sæst ofta størri loyalitetur frá veitarasíðu, størri títtleiki í keypi kann geva hægri avsláttur og tískil lægri kostnað og lægri umsitingarligar kostnaðir. Harafturímóti kunnu rammuavtalur við fleiri veitarar skapa meira kapping á marknaðinum og gera keyparan minni bundnan at veitaranum[8].

Tá rammuavtalur verða bodnar út, kann keyparin velja at snikka útboðið soleiðis saman, at tað ber til at hava meira enn ein veitara. Eitt nú kann tað verða møguligt hjá einari minni fyritøku í útjaðaranum at geva tilboð upp á partar av afturvendandi innkeypinum, sum verður boðið út. Annar møguleiki er, at tað verður bíligari hjá keyparanum at velja tveir ella fleiri veitarar fyri at halda samlaða kostnaðin á einum lægri støði. Hetta slagið av rammuavtalum hoyrir tó kortini undir tað fyrst nevnda slagið av rammuavtalu, nevniliga við einum veitara.

Í Føroyum hevur tað almenna gjørt sær nakrar royndir við rammuavtalum í sambandi við veiting av KT, mat og heilivág. Nakrar av hesum rammuavtalunum hava verið bodnar út. Tó so er hugsandi, at almennir myndugleikar kunnu samstarva um innkeyp við rammuavtalum, serliga tá talan er um vørur, sum eru lutfalsliga standardiseraðar.

*SKI*

Rammuavtalur í sambandi við alment innkeyp verða nógv nýttar í londum kring okkum og eru hesar ofta á landsplani ella sum samstarv millum kommunur. Eitt nú kunnu stovnar í Skotlandi gerast partur av einum almennum felags innkeypsneti og kenna vit eisini líknandi innkeypssamtak í Danmark, nevniliga Statens og Kommunernes Indkøbsforening (SKI). SKI hevur ein hóp av rammuavtalum innan øki so sum frálæru, bygging, KT og televeiting, skrivstovuamboð, mat, orku o.s.fr.

Almennir føroyskir myndugleikar hava eisini atgongd at keypa umvegis SKI við at skráseta seg. Sum nú er, er hesin innkeypsmøguleikin bert nýttur til keyp av ávísum vørum/tænastum og eru tað lutfalsliga fá, sum keypa inn við at nýta SKI sáttmálar. Ábendingar eru um, at nakrar vørur kunnu fáast fyri ein minni kostnað, ímeðan aðrar eru bíligari at keypa á føroyska marknaðinum[9].

### 1.4.4 Avbjóðingarrættur

Í summum londum, eitt nú í Danmark, hevur tann skipanin verið roynd, at fyritøkur hava havt rætt til at bjóða upp á virksemi , sum tað almenna sjálvt rekur ella útinnur. Hesin avbjóðingarrættur er eisini galdandi fyri tænastur, sum ikki eru bodnar út frammanundan. Í tílíkum førum hevur tað verið krav, at tað almenna samanber veruligar kostnaðir at veita tænastuna við ítøkiliga tilboðið frá einari privatari fyritøku.

---

r[8] Linthorst, M. M. And Telgen, J. (2006) Public purchasing future: Buying from multiple suppliers. http://www.utwente.nl/mb/ompl/staff/Linthorst/67_linthorst_telgen_edited_acc.pdf

[9] T.d. hevur KT-fyrisitingin hesar royndir

Royndir við avbjóðingarrættinum hava víst, at hann ikki hevur haft ætlaðu effektina, tí privatar fyritøkur ikki nýttu henda møguleika í nóg stóran mun. Orsøkin var serliga, at privatu fyritøkurnar ivaðust í, um tað var stríðið vert at gera eitt fullfíggjað tilboð, tá tað var ógreitt, um tað almenna yvirhøvur ynskti, at uppgávan varð loyst av privatum. Reglurnar um avbjóðingarrætt eru nú strikaðar í Danmark. Harafturímóti hevur Kommunernes Landsforening (KL) gjørt avtalu við danska statin um nøkur mál fyri, hvussu stórur partur av tænastuveitingunum hjá kommununum skulu bjóðast út.

Í Føroyum er eingin formlig forðing fyri, at privatar fyritøkur nýta avbjóðingarrættin, tí tað stendur altíð einari privatari fyritøku frítt at senda eitt tilboð uppá eina veiting til tað almenna. Tó  er hetta ikki vanliga nýtt. Allarhelst er tað ov ógjøgnumskygt og tungt hjá privatum fyritøkum at samanbera sínar prísir við veruligar kostnaðir hjá tí almenna at veita ávísar tænastur. Sí eisini punkt 1.8,  har avbjóðingarrætturin verður frámæltur at nýta í Føroyum.

**1.4.5 Alment-privat samstarv**

Alment privat samstarv skal í hesum høpi skiljast sum ein serligur formur fyri samstarvi millum tað almenna og privatar fyritøkur. Tó eru nógvir variantar av hesum samstarvi, men her verður einans meginsjónarmiðið lýst – ofta kallað PPP (public private partnership) ella á føroyskum APS (alment  privat samstarv).

Í tílíkum samstarvi verður ein sáttmáli gjørdur millum tað almenna og ein ella fleiri privatar fyritøkur um veiting av ávísari tænastu í eitt longri tíðarskeið. T.d. kann talan vera um at byggja og fíggja eitt fongsul og reka tað í 30 ár, afturfyri at tað almenna rindar eitt árligt gjald frá teirri løtu, fongslið verður tikið í nýtslu.  Í tílíkum førum verður ein fyritøka stovnsett, sum hevur til endamáls at samskipa og reka virksemi í sambandi við bygging og/ella rakstur av verkætlanini.

Tílíkar verkætlanir seta stór krøv til partarnar og krevja stórar íløgur frá privatari síðu. Tað er ógreitt júst nær hesin samstarvsformur loysir seg, men sambært summum metingumskal ein íløga vera omanfyri 100 mió. kr. fyri at ein tílík samstarvsavtala er lønandi. Serliga í Bretlandi og Írlandi hevur hesin samstarvsformur verið nýttur og eru ávísar fyritøkur og myndugleikar vorðin rættiliga roynd í at reka verkætlanir í almennum privatum samstarvi.

Hesin háttur er higartil ikki nýttur í Føroyum, hóast tað í tilgongdini viðv. Skálafjarðar-tunlinum eru brúkt nøkur elementir frá almennum-privatum samstarvi. Sí eisini punkt 1.8, har alment-privat samstarv (public-private partnership) sum innkeypsháttur verður frámæltur. Hetta merkir tó ikki, at tað almenna og privata ikki við fyrimuni kann samstarva meira. Tað merkir bert, at júst hesin háttur at samstarva verður frámæltur.

**1.4.6 Arkitektakappingar**

Arkitektakappingar er ein serligur formur fyri val av veitara. Í einari tílíkari tilgongd verður arbeiðið at sniðgeva ein bygning boðið út sum ein kapping. Har arktitektakappingar eru nýttar, er tað vanliga til sniðgeving av almennum bygningum.  Talan er tó bert um sjálva sniðgevingina av bygninginum og ikki eina endaliga ætlan fyri allari verkætlanini.

Tað eru tvey sløg av arkitektakappingum: projektkappingar og hugskotskappingar. Í projektkappingum er talan um ávísar uppgávur, har tað er lutfalsliga greitt, hvat endaligt úrslit skal fyriliggja. T.d. kann talan vera um, at ein kirkja skal byggjast á einum ávísum øki. Hinvegin eru hugskotskappingar um evni, har tað ikki fyriliggur ein endalig loysn fyri uppgávuna. Her kann talan t.d. vera um eitt øki, har tað ikki er greitt, hvussu bygningar skulu skipast, hvar teir skulu liggja og hvussu býtið skal vera millum bústaðir og handilsbygningar.

Arkitektafelag Føroya hevur gjørt kappingarreglur fyri limum sínum og sum skilst á serbólkinum, sum arbeiðir við reglum á byggi- og annleggsøkinum, hava hesar reglur virkað væl.

## 1.5 Meginreglur fyri alment innkeyp

Endamálið við teimum meginreglum, sum eru partur av almenna innkeypspolitikkinum er, at tær eru grundarlag undir framtíðar innkeypi hjá tí almenna. Øll, sum eru fevnd av innkeypspolitikkinum, skulu tí sum útgangsstøði fremja innkeypini í samsvar við hesar meginreglurnar. Harumframt er ætlanin, at meginreglurnar vera nýttar sum grundarlag tá rættarreglur, vegleiðingar og mannagongdir, verða settar í verk fyri alment innkeyp. Meginreglurnar fyri alment innkeyp eru lýstar niðanfyri.

Meginreglur fyri alment innkeyp

- Virði fyri pening
- Gjøgnumskygni
- At fremja virkna kapping

Harumframt eru eisini serlig atlit, sum kunnu takast í almenna innkeypinum

*Virði fyri pening*
Grundhugsjónin í almennum innkeypi skal vera virði fyri pening. Tilfeingið hjá tí almenna skal umsitast á so skynsaman hátt sum møguligt, har mest virði fæst í almennum innkeypi. Tað merkir at, tað almenna velur tær loysnir, har mest virði fæst fyri peningin. Hetta kann eitt nú gerastvið:

- at nágreinilig krøv eru tilskilað í kravfestingini soleiðis, at skikkaður veitari verður valdur út frá prísi
- at veitari verður valdur út frá, hvør kann veita mest virði innan ein givnan fíggjarkarm
- at veitari verður valdur út frá einari samlaðari meting av prísi og øðrum viðurskiftum (t.d. dygd, royndum, tænastu og veitingartreytum).

*Gjøgnumskygni*
Mannagongdir í sambandi við alment innkeyp skulu verða gjøgnumskygdar. Fyritøkur, borgarar og onnur skulu hava álit á, at almenn innkeyp eru ópartísk, rættvís, saklig og sýna opinleika. Tað merkir, at:

- Avgerðir um at keypa inn/bjóða út á privata marknaðinum fara fram eftir alment ásettum leisti

- Eitt dygdargott arbeiði er gjørt bæði í útbjóðingartilfari og fyri at eyðmerkja møguligar veitarar (um keypt verður uttan at bjóða alment út)
- Viðgerðin av veitarum er eins
- Opinleiki er um avgerðina og grundgevingar fyri val av veitara eru haldgóðar

*At fremja virkna kapping*
Grundreglur um virkna kapping eru partur av almenna innkeypspolitikkinum, eins og tær eru grundleggjandi í vinnupolitikkinum. Virkin kapping er ein fortreyt fyri, at marknaðurin verður effektivur og kappingarførur. Sostatt er tað umráðandi, at tað almenna er við til at undirbyggja hetta og ikki við sínum innkeypi er við til at avmarka kappingina.

Almenni innkeyparin hevur tí ábyrgd av at nýta teir møguleikar, sum eru í innkeypstilgongdini at skapa virkna kapping. At skapa kapping í almennum innkeypi inniber, at almenni innkeyparin vísur ansni fyri kappingini í allari tilgongdini. Sostatt snýr kappingarfremjan seg ikki einans um val av innkeypshátti[10], men um eina røð av avgerðum, sum tað almenna tekur í sambandi við keyp av vørum, tænastum, byggi- og annleggsverkætlanum o.s.fr. Tað er tó umráðandi at hava í huga, at kappingarfremjan kann vera ymisk frá einari verkætlan til eina aðra og er nær tengd at marknaðinum og hvussu hann er uppbygdur. Sum partur av innkeypstilgongdini er tað tí ábyrgdin hjá almenna innkeyparanum at seta seg inn í marknaðarstøðuna..

**Serlig atlit í almenna innkeypinum**
Tað kann verða ráðiligt og í summum førum neyðugt hjá almennum innkeyparum at taka serlig atlit í innkeypinum. Tað merkir, at tað almenna kann í ávísum førum seta krøv til innkeyp, tá tað er samfelagnum at gagni. Her kann talan vera um samfelags- og arbeiðsmarknaðargagnlig áhugamál, sum kunnu ávirka hvussu og hvat keypt verður. Eisini er umráðandi at innkeyparar seta umhvørviskrøv, so almennu Føroyar eru við til at menna grønar marknaðir og harvið burðardygga menning.

Í øðrum londum verður alt meira eisini hugsað grønt tá tað almenna keypir inn, og hugtakið grønt alment innkeyp (Green Public Procurement) merkir, at almennir myndugleikar royna at keypa vørur og tænastur, sum í síni lívs-ringrás (ella livitíð), hava betur árin á umhvørvi, samanborið við vørurnar og tænasturnar, sum annars vórðu keyptar.

Dømi uppá serlig atlit (samfelags-, arbeiðsmarknaðar- og umhvørvisgagnlig) í almenna innkeypinum eru:

- Keyp av umhvørvisvinarligum bilum
- Val av veitara har samlaða dálkingin av framleiðslu/flutning av vøruni er sum minst
- Veitarar, sum hava eina ávísa mongd av lærlingum í mun til støðd av fyritøku kunnu nýta hetta sum kappingarparametur
- Veitarar, sum hava fólk við vardum størvum (í lutfall til støðd av fyritøku) kunnu nýta hetta sum kappingarparametur

[10] Innkeypshættir verða viðgjørd í punkt 1.7, men kunnu í høvuðsheitum býtast í: hissini keyp, útboð (almenn og avmarkað), rammuavtalur og avbjóðing.

Sostatt kunnu serlig atlit takast í almenna innkeypinum í tann mun tað er skynsamt tó so skulu hinar meginreglurnar fyri innkeypi samstundis verða fylgdar.

## 1.6 Altjóða sáttmálar í sambandi við alment innkeyp

Tað eru serliga tveir altjóða sáttmálar, sum eru viðkomandi at nevna í samband við alment innkeyp. Hesir eru Hoyvíkssáttmálin og WTO sáttmálin.

### 1.6.1 Hoyvíkssáttmálin

Við Hoyvíkssáttmálanum frá 2005 gjørdust Føroyar og Ísland eitt felags búskaparøki. Hetta merkir, at tað við ávísum undantøkum er fríur flutningur av vørum, tænastum, arbeiðsmegi og kapitali millum londini bæði. Tað er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkis- ella framleiðslustað.

Hoyvíkssáttmálin er ein røð av alment galdandi prinsippum og tí er neyðugt at tulka sáttmálan í hvørjum einstøkum føri. Tó so er greitt, at íslendsk boð uppá føroyskar almennar uppgávur, sum eru bodnar út, ikki kunnu vrakast grundað á tjóðskap ella virkisstað. Hinvegin er einki krav í Hoyvíkssáttmálanum um, at uppgávur *skulu* vera lýstar í Íslandi. Harumframt er heldur einki krav um, at útbjóðingartilfar skal vera á íslendskum máli umframt á føroyskum. Nærri er greitt frá Hoyvíkssáttmálanum í viðheft skjal 2.

### 1.6.2 WTO Sáttmálin

Í WTO-høpi er avtala um alment innkeyp, Government Procurement Agreement (GPA). ES hevur ratifiserað hesa avtalu vegna Danmark. Hóast WTO-sáttmálin er galdandi fyri Føroyar, er ratifikatiónin av GPA ikki galdandi fyri Føroyar, tí Føroyar eru ikki partur av ES. Føroyar eru tí ikki bundnar til at fylgja reglunum í GPA.

## 1.7 Tilmæli í almennum innkeypi og til innkeypshættir

Grundað á omanfyrinevndu viðgerð av viðurskiftum, sum gera seg galdandi fyri alment innkeyp í Føroyum eru nøkur høvuðstilmæli gjørd um alment innkeyp og innkeypshættir. Nøkur av hesum viðurskiftum (á næstu blaðsíðu) vera eftir ætlan regulerað í lógaruppskotinum um útboð. Allar upphæddir eru *uttan* MVG.

Tilmæli í almennum innkeypi og til innkeypshættir

- Keyp úr kr. 50.000 upp til kr. 800.000: Minst tvey framíhjáboð[11]
- Keyp úr kr. 800.000: Skulu bjóðast út antin sum alment útboð ella avmarkað útbjóðing við almenna undangóðkenning.
- Rammusáttmálar yvir kr. 800.000 skulu bjóðast út
- Mál í útbjóðingartilfari skal vera føroyskt umframt, at annað viðkomandi mál kann nýtast har bjóðað verður út uttanfyri Føroyar. Føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at lata inn tilboð á føroyskum.
- Har tað fremur kapping kunnu almennir myndugleikar tilskila sær rætt, um tað er skynsamt og effektivt, at tilluta útboðið til meira enn ein veitara t.d. við at býta veitingina upp í fleiri vørubólkar í útbjóðingartilfarinum. Fyritøkur kunnu tá bjóða uppá partar av uppgávuni.
- Útboð og innkeyp *kunnu* býtast upp har tað er skynsamt. Í útbjóðingartilgongdini skal umhugsast hvussu vøru/tænastubýtið er sett saman í einum almennum útboði. Hetta skal skiljast so, at har tað er gott fyri kappingina á marknaðinum, kunnu uppgávur bjóðast út við tí fyriliti, at meira enn ein fyritøka vinnur uppgávuna. Sostatt kunnu útbjóðingar býtast upp í fleiri vetiingar so fleiri fyritøkur (eisini smærri) vinna sáttmálan. Við hesum er ætlanin, at uppgávur skulu, har tað er ráðiligt og skynsamt (t.v.s. effektivt), býtast upp í útbjóðingartilfarinum í veitingar eftir t.d. landafrøðiligt øki, vørubólkar ella tíðspunkt fyri veitingarnar. Tó skal samlaða útboðið vera tað sama og talan er ikki um at býta eina útbjóðing upp soleiðis, at talan verður um t.d. tvær veitingar á kr. 400.000 fyri at umgangast skal eina útbjóðing.

- *Keyp úr kr. 50.000 upp til kr. 800.000*

Fyri keyp, sum eru úr 50 - 800.000 krónur verður mælt til, at minst tvey framíhjáboð verða útvegað. Eitt framíhjáboð inniber, at myndugleikin setur seg í samband við minst tveir møguligar veitarar fyri at fáa eitt tilboð uppá ítøkiligu uppgávuna. Tey, sum veita tilboð skulu fáa somu upplýsingar fyri at tryggja, at tilboð verða givin undir somu fortreytum.

Almenni innkeyparin kann eisini fáa fleri enn tvey framíhjáboð. Mælt verður til, at tá talan er um landið, sum keypir inn skulu innkeyparar gera sær ómak at eyðmerkja viðkomandi veitarar so, at tað ikki bert eru veitarar í ávísum landafrøðiligum økjum, sum hava møguleijka at geva framíhjáboð. Fyri kommunur kann hetta merkja, at framíhjáboð verða útvegað frá veitarum uttanfyri kommununiøkið– um hetta ikki longu er gjørt við tveimum teimum fyrstu framíhjáboðunum. Ger sær ómak at eyðmerkja allar viðkomandi veitarar. Hetta kann t.d. gerast við, at kommunur biðja um minst eitt tilboð uttanfyri kommunua. Hóast uppgávan er niðanfyri kr. 800.000 kann innkeyparin velja at bjóða uppgávuna út. Tað er eingin treyt, at uppgávan skal vera omanfyri kr. 800.000 fyri at vera boðin út.

Á teimum marknaðum har tað bert er ein veitari og tað ikki er ráðiligt at biðja um framíhjáboð uttanfyri Føroyar, er tað sostatt ikki ein møguleiki at fáa fleiri enn eitt framíhjáboð. Almenni innkeyparin hevur tó skyldu til at kunna seg um, hvørjir veitarar eru á marknaðinum. Arbeiðið, sum verður gjørt í innkeypstilgongdini skal tó vera í samsvar við virðið á innkeypinum.

---

[11] Útboðslógin sigur í mesta lagi tvey framíhjáboð. Har útboðslógin er galdandi hevur lógin yvirvág í mun til innkeyps- og útboðspolitikkin.

- *Uppgávur yvir kr. 800.000 skulu bjóðast út*

Sum útgangsstøði skulu allar uppgávur yvir kr. 800.000 verða bodnar út. Tilgongdin til útbjóðing er nærri lýst í útboðspolitikkinum í parti 2. Tó so eru nøkur viðurskifti, sum kunnu umrøðast her.

Arbeiðsbólkurin er av teirri áskoðan, at tað ber til í flestu førum at bjóða út uppgávur, sum eru yvir kr. 800.000 og eisini, at tað viðhvørt loysir seg fyri uppgávur, sum liggja niðanfyri hetta mark. Bygnaðurin á marknaðinum í Føroyum er í fleiri førum duopol og tá eru bert tveir veitarar. Hetta er tó ikki í sjálvum sær ein orsøk til ikki at bjóða eina veiting alment út, men heldur biðja um framíhjáboð. Til hetta eru tvær orsøkir.

Fyrst og fremst kann tað vera kappingarfremjandi at bjóða uppgávur út í staðin fyri at fáa framíhjáboð. Tað viðførir at aðrir veitarar, sum kunnu hugsast at gerast áhugaðir eru kunnaðir um útbjóðingina. Í tílíkum førum er tað hugsandi, at talan er um føroyskar veitarar, sum kunnu gerast kappingarførir við t.d. at fáa í lag samstarv við aðrar fyritøkur, at verandi fyritøkur fara inn á eitt nýtt virkisøki, ella um útlendskar veitarar, sum fáa áhuga fyri útbjóðingini.

Harnæst eigur ein uppgáva av hesari støddini at vera væl útgreinað og tá er munurin á arbeiðsorkuni, sum verður løgd í at bjóða út í mun til at fáa framíhjáboð, ikki so stórur.

Har talan er um eitt ikki-lógarásett monopol kann tað, eins og við duopol, virka kappingarfremjandi at bjóða eina uppgávu út uttanfyri Føroyar.

Kortini eru nøkur undantøk, har frávik kann gerast í kravinum um at bjóða uppgávur út, sum eru yvir kr. 800.000. Hesi eru:

  - Fyri uppgávur, sum verða keyptar á einum marknaði har talan er um lógarásett monopol t.d. søla av rúsdrekka og elveiting.
  - Fyri uppgávur, har tað bert er ein veitari og tað ikki ber til ella er ráðiligt at keypa vøruna inn úr øðrum landi.
  - Har tað vegna umstøður ella vegna skipanir er neyðugt at keypa ávíst merki (t.d. forrit) og tað bert er ein veitari, sum umboðar merkið í Føroyum.
  - Har tað kunnu vera stórar neiligar avleiðingar (t.d. fíggjarligar avleiðingar ella vegna neyðstøðu), um uppgávan verður boðin út.
  - Har vørur/tænastur eru av slíkum slag, at aðrar vøru/tænastur ikki kunnu uppfylla somu treytir.
  - Har lógarásetingar forða fyri at bjóða út.
  - Har veitingin er av slíkum slag, at tað samanumtikið ikki verður mett at vera ein fyrimunur at krevja eitt útboð av uppgávuna. Nærri ásetingar um hvørjar veitingar hetta umfatar verða gjørdar í komandi útboðslógini.

- *Rammusáttmálar yvir kr. 800.000*

Ein rammusáttmáli, sum hevur eitt virði uppá meira enn kr. 800.000, eigur at vera boðin út eftir somu fortreytum, sum vanligar útbjóðingar. Er talan um ein rammusáttmála fyri eitt tiðarskeið, longri enn 4 ár, verður virðið roknað fyri 4 ár.

- *Tungumál* Sum útgangstøði skal føroyskt mál vera nýtt í útbjóðingartilfarinum, og tað skal vera gjørligt at lata inn tilboð á føroyskum. Er ynskiligt at skapa áhuga uttanlands fyri at fáa størri kapping, so eigur útbjóðingartilfar at verða orðað bæði á føroyskum og á viðkomandi útlendskum máli.

Í teimum førum har ein almennur myndugleiki hevur útlendska serfrøði at meta um tilboð ella annars at gera metingar/ráðgeva út frá antin útbjóðingartilfari ella tilboði, eigur almenni myndugleikin at bera kostnaðin av at gera neyðugar umsetingar av tilfarinum..

- *Uppbýti av innkeyp og útboð*

Í útbjóðingartilgongdini skal umhugsast um tað kann vera ein fyrimunur at býta samlaða veitingina upp í minni partar. Endamálið við hesum kann vera at økja um kappingina, um tað t.d. finst eitt virki, sum kann bjóða upp á ein part av uppgávuni, men ikki er ført fyri at bjóða uppá samlaðu veitingina. Eisini kann tað vera, at summi virki hava ein serkunnleika innan ávísar partar av veitingini, og tað tí samanumtikið fæst ein betri og/ella bílgari loysn við at geva fyritøkunum møguleika at bjóða upp tann partin av veitingini, har tær eru betri og/ella bíligari.

Endamálið við eium uppbýti kann eisini vera at styrkja møguleikarnar at varðveita framtiðar kappingina á einum marknaði.

Sum dømi um at stimbra kappingina uppá langt sikt kann nevnast, at har tað eru fáar fyritøkur á einum marknaði er tað darvandi fyri kappingina um *ein* fyritøka fær eina stóran rammusáttmála yvir eitt áramál um úrslitið er, at eingin onnur fyritøka er eftir á marknaðinum, tá sáttmálaskeiðið er runnið. Tað er sostatt ein skylda hjá tí, sum bjóðar út at meta veitingar um tað er ráðiligt og skynsamt at býta eina veiting upp, so bjóðast kann á partar av samlaðu veitingini.  Uppbýtið kann til dømis vera grundað á:

- Vørubólkar: Heldur enn at samla allar vørur undir ein bólk kunnu vørur býtast upp á nakrar bólkar við tí fyri eyga, at fyritøkur kunnu bjóða uppá antin allar vørubólkar ella úrvaldar vørubólkar.
- Landafrøðiligt øki: Her kann veiting vera býtt upp í útbjóðingartilfarinum eftir landafrøðiligum øki har fyritøkur kunnu bjóða uppá at veita til øll øki ella úrvald øki.
- Tíð: Til ber at býta uppgávur upp í veitingar innan t.d. vanlig skrivstovutíð og uttanfyri vanliga skrivstovutíð.

Tað er tó eitt mark fyri, hvussu nógv ein uppgáva kann býtast upp og her skal skynsemi brúkast. Almenni innkeyparin eigur harumframt at tilskilja sær rætt í útbjóðingartilfarinum at velja ein *ella* fleiri veitarar.  Á henda hátt kann tryggjast, at almenn innkeyp eru effektiv samstundis sum atlit verður tikið til fyritøkur, sum eru kappingarførar á ávísum økjum, men sum ikki neyðturviliga hava eina breiða og samlaða veiting.

## 1.8 Frámæli í almennum innkeypi og innkeypshættum

Í tilgongdini at gera ein almennan innkeyps- og útboðspolitikk hava fleiri viðurskifti verið umrødd, men nøkur teirra verða her frámæld tí tey vera mett at vera óhóskandi til føroysk viðurskifti í løtuni. Tað kann tó hugsast, at hesi seinni kunnu koma uppá tal.

| |
|---|
| Frámæli í almennum innkeyp og innkeypshættum<br>• Avbjóðingarrætturin<br>• Innkeypsportal<br>• Alment privat samstarv |

- *Avbjóðingarrætturin*

Avbjóðingarrætturin, sum varð umrøddur í punkt 1.4.4. verður her frámæltur. Orsøkin er tann, at royndir aðrastaðni vísa at tað hdvur verið avmarkaður vilji hjá fyritøkum at bjóða uppá eina uppgávu tá tað almenna ikki hevur tikið avgerð um at bjóða hana út. Fyri tað fyrsta hevur tað víst seg, at fyritøkur er lítið hugaðar í, at bjóða uppá tílíkar uppgávur. Tilgongdin er tíðarkrevjandi og tá ein almennur myndugleiki ikki hevur víst í gerð, at tey eru sinnað at útveita uppgávuna er tað ein størri váði hjá einari fyritøku at nýta tíð og orku at gera eitt ítøkiligt tilboð.

- *Elektronixkur innkeypsportalur*

Ein innkeypsportalur er ein formur fyri elektroniskum innkeyp og inniber, at fyritøkur leggja vørur á ein dátugrunn við viðkomandi upplýsingum um vøruna so sum prís, veitingartreytir, vørufrágreiðing osfr. Síðani ber til hjá almenna myndugleikanum at fara inn á portalin og lættliga síggja hvør veitari hevur viðkomandi vøruna til besta prís. Hesin formur fyri innkeyp verður tó frámæltur tí arbeiðsbólkurin hevur fingið afturmeldingar frá vinnuni, at flestu fyritøkur eru so smáar, at tað er ov krevjandi hjá teimum at leggja øll vørunummør inn á ein dátugrunn og harumframt viðlíkahalda upplýsingarnar.

- *Alment privat samstarv*

Í punkt 1.4.5 er alment-privat samstarv (Public Private Partnership) viðgjørt sum ein innkeypsháttur. Hesin verður tó frámæltur her av tí, at tað eru sera høgir transaktiónskostnaðir í einum slíkum samstarvshátti. Alment privat samstarv krevur eisini, at bæði almenni og privati geirin menna royndir og førleikar innan hendan innkeypsháttin. Mett verður, at ov fáar verkætlanir eru av hesari støddini (sum helst skulu vera omanfyri 100 mió. kr) , fyri at alment privat samstarv loysur seg. Hetta merkir tó ikki, at tað ikki ber til at nýta partar av hesum samstarvshátti, ella at tað als ikki loysir seg at tað almenna og tað privata samstarva. Tað merkir bert, at hetta ítøkiliga slagið av samstarvi verður frámælt.

## 1.9 Førleikamenning og samstarv um alment innkeyp og útboð

Fleiri ferðir hevur verið ført fram, at tað er avbjóðandi at vera innkeypari og at tað krevur serligar førleikar at vera ein góður innkeypari. Førleikamenning og samstarv eru sostatt av avgerandi týdningi fyri at fáa innkeyps- og útboðspolitikkin væl grundfestan. Tí er ikki nóg mikið at gerareglur, eitt miðvíst áhaldandi arbeiði er eisini alneyðugt.

Eitt væl skipað innkeyp saman við kappingarútsetan og útboð (hesi eru nærri umrødd í útboðspolitikkinum í parti 2) krevur, at ábyrgdin fyri økinum verður løgd hjá ávísum myndugleika. Talan er hóast alt um eitt øki, har eitt meira skynsamt innkeyp eigur at spara tí almenna peningrog at produktiviteturin økist í samfelagum (við at fremja virkna kapping). Tí verður mælt til, at ábyrgd eigur at leggjast á ávísan myndugleika, sum kann hava til uppgávu at:

- Veita ráðgeving um alment innkeyp og útboð
- Vísa til mannagongdir í sambandi við alment innkeyp og útboð
- Samskipa innkeypsførleikamenning innan tað almenna
- Gera eftirmetingar av innkeyps- og útboðspolitkkin og útbjóðingarlógini og standa fyri møguligum broytingum/dagføringum
- Hava eftirlit við, at innkeyps- og útboðspolitikkurin og útbjóðingarlógin verða hildin

*Førleikamenning*

Sum høvuðsamboð skal innkeyps- og útboðspolitikkurin saman við útboðslóg vera grundarlag undir almennum innkeypi. Tað er eyðsæð, at tað setur krøv til innkeyparar at taka støðu til keyp av so nógvum ymiskum vørum/tænastum. Marknaðarbygnaðurin fyri teimum ymsu vørubólkunum er ólíkur og tað kann vera trupult at kenna mun á vørum/tænastum. Fyri at stuðla innkeyparum, hevur arbeiðsbólkurin fyri innkeyps- og útboðsreglur gjørt vegleiðingar fyri mest vanligu innkeypini[12]. Hesar vegleiðingar kunnu nýtast sum eitt hjálpiamboð, tá bjóðað verður út.

Innkeyp er ein týðandi partur av tí, sum almennir myndugleikar takast við og tí er ráðiligt, at hvørt almennir myndugleikar hava atgongd tilfólk við innkeypsførleikum, bæði tá tað snýr seg um innkeypsroyndir og eisini kunnleika til innkeyps- og útboðspolitikkin og útbjóðingarlógina. Myndugleikin, sum hevur ábyrgdina av almennum innkeypi um hendi skal saman við ráði og stovnum skipa fyri førleikamenning. Harumframt verður kunning um nýggja innkeyps- og útboðspoltikkin frá arbeiðsbólkinum, tá hann verður settur í gildi.

*Samstarv*

Í løtuni er einki formligt samstarv innan tað almenna um innkeyp og útboð.  Mælt verður til, at tílík samstørv verða sett í verk og verður hetta mett sum ein ábyrgd hjá einstøku stovnunum, kommununum og ráðum at samskipa innkeyp á tann hátt, at tað verður so skynsamt, sum til ber. Har almennir myndugleikar skulu nýta lutfalsliga eins vørur/tænastur eiga samstørv fáast í lag, har peningur kann sparast.

Tað er eisini sera umráðandi, at almennir myndugleikar samskifta við onnur um innkeyp og útboð soleiðis, at tey kunnu fáa vegleiðing frá teimum, sum hava royndir/førleikar at keypa inn, t.d. við útboði ella við innkeypi av ávísum vørum á ávísum marknaðum. Sostatt hevur tað almenna skyldu til at arbeiða saman, vitanarbýta og førleikamenna innkeypið í tann mun, tað er møguligt.

*Útbjóðingarheimasíða*

Mælt verður til, at ein heimasíða verður ment við tí endamáli, at allar útboðslýsingar hjá tí almenna verða savnaðar á einum stað Tá ein tílík heimasíða er virkin skulu allar útbjóðingar lýsast á hesum miðli. Ætlanin er, at útbjóðingarheimasíðan skal geva brúkarum (bæði almennum og privatum) niðanfyristandandi møguleikar:

[12] Hesar vegleiðingar verða gjørdar í løtuni og vera væntandi klárar, tá endaligi innkeypspolitikkurin verður settur í verk

- *Skráseting í dátugrunn fyri at móttaka teldupostar*: Fyritøkur skulu hava møguleika at skráseta seg at móttaka sjálvvirkandi teldupostar um útbjóðingar, sum verða lagdar inn á heimasíðuna. Harumframt ber til hjá teimum, sum umsita heimasíðuni at senda teldupostar við aðrari viðkomandi kunning til brúkarar um t.d. broytingar í lóggávu, førleikamennandi skeið og kunning annars um alment innkeyp og útbjóðing.
- *Vitanarbýti: Almennir myndugleikar kunnu nýta hei*masíðuna fyri at síggja, hvussu onnur hava skrivað útbjóðingartilfar og eru farin fram í sambandi við útbjóðingar.
- *Kunning um útbjóðingartilgongd:* Ætlanin er, at heimasíðan skal hava vegleiðingar til tað almenna og til fyritøkur um lóggávu, at skriva eitt tilboð (t.d. ein vegleiðandi frymil), at skriva útbjóðingartilfar og útbjóðingarmannagongdir annars.

# 2. Partur: Útboðspolitikkur

## 2.1 Ætlanin við útboðspolitikkinum

Í fyrsta parti av hesum skjali hevur almenna innkeypið verið viðgjørt sum heild og teir ymsu innkeypshættirnir umrøddir. Harumframt varð mælt til, hvørjir innkeypshættir eru best egnaðir at nýta í Føroyum. Serliga varð viðmælt, at innkeyp gjøgnum útboð eigur at vera ein av høvuðsinnkeypshættunum. Í hesum partinum verður útboð, sum ein serligur innkeypsháttur, umrøtt og hvussu útboðspolitikkurin hjá tí almenna framyvir skal virka.

Útboðspolitikkurin krevur eina serstaka viðgerð í innkeyspolitikkinum av trimum orsøkum.

1. Innkeyp gjøgnum útboð kann vera við at fremja kapping á marknaðinum.
2. Talan er aloftast um stórar upphæddir tá boðið verður út. Sostatt er neyðugt at hava greiðar og gjøgnumskygdar reglur fyri útbjóðingar. er
3. Almennar uppgávur eiga at kappingarútsetast. Við hesum skal skiljast, at almenni geirin "útsetur" uppgávur fyri kapping, t.v.s. ein meting fer fram, um ávísar uppgávur kunnu loysast meira effektivt í privata geiranum og harnæst antin bjóðaðar út ella framíhjáboð útvegað frá fyritøkum.

### 2.1.1 Endamál og mál við útboðspolitikkinium

Við omanfyrinevndu orsøkum í huga er yvirskipaða endamálið við útboðspolitikkinum at hava eitt felags grundarlag hjá almenna geiranum fyri at a) meta um hvørjar uppgávur kunnu kappingarútsetast og b) hava greiðar karmar at fyrihalda seg til í útbjóðingarmannagongdini. Málini við útboðspolitikkinum eru sostatt:

*Mál 1.* Kappingarútsetan: At tað almenna bjóðar uppgávur út í tann mun tað er skynsamt. Fyri at røkka hesum máli skal útboðspolitikkurin og samsvarandi reglur/vegleiðingar virka sum eitt grundarlag hjá almennum myndugleikum fyri at gera metingar hvørjar uppgávur eru hóskandi at bjóða fram á privata marknaðinum.

*Mál 2.* Útboðstilgongdin: At útbjóðing hjá tí almenna verður meira professionell og gjøgnumskygd. Fyri at røkka hesum máli er ætlanin at áseta meginreglur fyri útbjóðingar hjá tí almenna. Tað merkir, at ásetingar verða gjørdar fyri útbjóðingarmannagongdina. Hetta umfatar eitt nú útbjóðingartilfar, metingarstøði í útbjóðingini, hvar lýst verður við útboði og mannagongd í sambandi við val av veitara.

Í fyrsta máli er talan serliga um, at almenn ráð og stovnar í størri mun gera metingar um, hvørjar tænastuveitingar, sum tey áður hava loyst innanhýsis, eru hóskandi at bjóða út t.v.s. uppgávurnar verða kappingarútsettar. Dømi um veitingar, sum ofta eru framleiddar av almenna geiranum, sum kunnu hugsast at verða skynsamar at bjóða út eru reingering, kantinuvirksemi, matútbering til eldri, húsavarðartænastur o.s.fr.

Hyggja vit at máli 2 er talan um sjálva tilgongdina og mannagongdina at bjóða uppgávur út. Her verður sipað til meginreglur fyri útbjóðingarmannagongdina. Við hesum málunum verður tí sjóneykan sett á uppgávur, sum í dag verða keyptar í privata geiranum *umframt* tær uppgávur, sum í dag verða loystar innanhýsis í ráðum og stovnum hjá tí almenna.

## 2.2 Kappingarútseting

Ein stór broyting í útboðspolitikkinum í mun til galdandi reglur er, at krøv verða sett til myndugleikar um at eftirkanna alt virksemi hjá sær fyri at gera metingar um, hvørjar uppgávur eiga at verða bodnar út, t.v.s. kappingarútsettar. Tað er ymiskt, í hvønn mun tað almenna kappingarútsetur uppgávur. Niðanfyri eru nøkur dømi[13] um uppgávur, sum kunnu hugsast at vera egnaðar at kappingarútseta.

Dømi:
Rakstur av kantinu
Uppseting og innrykking av lýsingum
Reingerðing
Móttøkuvirksemi
Flutningur
Umsiting í sambandi við ferðing (t.d. keyp og søla av ferðaseðlum)
Matskipanir til eldraøki
Rakstur av kirkjugørðum
Frítíðarfeløg fyri børn
Forriting og menning av heimasíðum
Rakstur og tænastuveitingar av teleskipanum
Viðlíkahald av bygningum

| Myndugleikar skulu gjøgnumganga uppgávur og gera metingar um, hvørjar uppgávur kunnu kappingarútsetast í minsta lagi 4. hvørt ár. Úrslit av gjøgnumgongdini skal almannakunngerast. |
|---|

Tey, sum eru umfatað av útboðspolitikkinum, skulu tí við jøvnum millumbilum gera metingar um, hvørjar uppgávur kunnu kappingarútsetast. Tílíkar metingar skulu gerast í minsta lagi fjórða hvørt ár.  Mælt verður eisini til, har til ber, at almenni myndugleikin almannakunnger hvørjar uppgávur væntandi verða bodnar út komandi árið. Hetta kann geva fyritøkum møguleika at fyrireika seg til at veita tilboð.

Uppgávurnar, sum myndugleikar røkja, eru sera ymiskar bæði í útinnan og vavi. Tí er neyðugt, at tá myndugleikar taka avgerð um at kappingarútseta uppgávur, at hetta er grundað á nøkur ítøkilig metingarstøði. Tey mest týðandi metingarstøðini verða nú viðgjørd.

### 2.2.1 Meting av uppgávum, sum hóskandi til kappingarútsetan
Niðanfyristandandi metingarstøðini skulu skiljast soleiðis, at tey verða nýtt at skapa eina heildarmynd fyri, at myndugleikin kann meta um, í hvønn mun ymsu uppgávurnar hjá teimum eru hóskiligar at kappingarútseta.

[13] Hesi dømi skulu skiljast einans sum dømi og ikki nakrar uppgávur, sum arbeiðsbólkurin fyri innkeyps- og útboðsreglur hava umrøtt serstakliga. Heldur er talan um dømi uppá royndir frá øðrum londum og er hetta bert  ætlað at geva lesararnum íblástur. Tað er væl hugsandi, at hesar uppgávur eru væl hóskiligar at kappingarútseta hjá nøkrum myndugleikum og ikki hjá øðrum.

Tá myndugleikar gjøgnumganga uppgávur og skulu avgera hvørjar uppgávur skulu/kunnu bjóðast út, eiga niðanfyristandandi metingarstøði at vera grundarlag fyri metingini:

1. Er talan um eina myndugleikauppgávu?
2. Eru avmarkingar fyri útbjóðingar í viðkomandi lóggávu?
3. Hvussu stór er uppgávan?
4. Hvørjar møguleikar eru at samanseta/sundurskilja uppgávuna?
5. Hvørjar royndir hevur myndugleikin við at bjóða út?
6. Er møguligt at lýsa/avmarka uppgávuna?
7. Er uppgávan part eina skipan?
8. Hvussu er bygnaðurin á marknaðinum?
9. Hvørji trygdaratlit skulu takast?
10. Hvørjir kostnaðir eru í sambandi við kappingarútsetan?
11. Hvørjir møguleikar eru fyri at effektivisera uppgávuna?
12. Er talan um ávísar førleikar og førleikamenning, sum myndugleikin ynskir at varðveita?

*1. Myndugleikauppgáva*

Orsakað av rættartrygdini hjá borgarum, kunnu myndugleikauppgávur ikki kappingarútsetast. Tað er tó ofta trupult at gera mark ímillum rakstraruppgávur og myndugleikauppgávur. Nakrar uppgávur eru heilt greitt myndugleikauppgávur, eitt nú tá avgerðir verða tiknar, planlegging og at seta lógir í verk. Hinvegin kunnu fleiri uppgávur, sum er tætt knýttar at myndugleika-uppgávuni væl hugsast at vera rakstrarvirksemi.

Tá støða skal takast til, um ein uppgáva er myndugleika- ella rakstraruppgáva, eru nøkur øki, har tað kann vera trupult at tilskila, hvør partur er myndugleikauppgáva. Hesi øki eru:

- *Fyrireiking av málum*: Her kann hugsast, at tað er loyvt at lata eitt virki frá privatu vinnuni fyrireika eitt mál, um tað ikki hevur ávirkan á mannagongdina ella sjálva avgerðina. Í høvuðsheitum kann sigast, at jú størri rásarúm tað er at lýsa eitt mál á ymsan hátt, tess meira ivingarsamt er at kappingarútseta uppgávuna.
- *Eftirlit*: At seta í verk eftirlit er altíð ein mynduleikauppgáva. Tað sama er galdandi fyri avleiðingina av eftirlitinum um hetta t.d. endar í einum kravboði. Tó so kann tað í ávísum førum vera gjørligt at gera avtalu við privatar veitarar um hjálp til *útinningina* av eftirlitinum.

*2. Avmarkingar í lóggávu*

Í summum førum kann ein lóggáva vera soleiðis háttað, at hon avmarkar møguleika fyri kappingarútseting – eisini har talan ikki er um myndugleikauppgávu.

*3. Stødd av uppgávu*

Í innkeypspolitikkinum fyri landið er mælt til, at uppgávur sum verða keyptar inn í privata geiranum og sum eru yvir 800.000 kr., skulu bjóðast út. Tá myndugleikar gera metingar um, hvørt uppgávur eru hóskiligar at bjóða út, kann tað vera trupult at áseta, hvussu nógv virði ein uppgáva hevur, ella hvussu nógv hon kostar á privata marknaðinum. Tó so er neyðugt í hvørjum einstøkum førum at gera eina rímuliga meting av, hvussu nógv uppgávan verður

loyst fyri innanhýsis í myndugleikanum. Um ikki verður tað sera torført at avgera um ein uppgáva skal kappingarútsetast.

*4. Møguleikar fyri at samanseta/sundurskilja uppgávuna*
Nakrar uppgávur eru betur hóskandi at kappingarútsetast saman við øðrum, heldur enn at sundurskilja uppgávurnar og bjóða tær út hvør í sínum lagi. Sum dømi kann nevnast at fleiri stovnar velja at hava bókhald saman hóast uppgávan kundi verið ov smá at bjóða út  Her er tað væl hugsandi, at tað kann loysa seg at kappingarútseta uppgávur sum eina veiting heldur enn fleiri ymiskar.

*5. Royndir við útboð*
Royndirnar at bjóða út hjá myndugleikum eru sera ymiskar. Meðan nøkur javnan bjóða út, eru heldur nógv, sum ongantíð hava roynt tað. Tað førir við sær, at førleikarnir hjá almennum myndugleikum eru ójavnir. Tí er tað hugsandi, at ráð, stovnar og kommunur kunnu antin fáa vegleiðing um útbjóðing ella bjóða út saman við øðrum, sum hava drúgvari royndir á hesum økinum.

*6. Møguleikar at lýsa/avmarka uppgávuna*
Nakrar uppgávur hjá myndugleikum eru sera samansettar og torført kann vera at avmarka uppgávuna t.d. um hon hongur neyvt saman við øðrum uppgávum. Uppgávan má tó verða so mikið greið og neyvt lýst fyri, at hon kann takast við sum ein møguliga útboðsegna uppgáva.

*7. Binding til skipanir*
Tað er ikki óvanligt, at keyp av skipanum kann binda myndugleikar til at nýta ávísan veitara t.d. tí veitarin er einasti, sum kann tillaga ella viðlíkahalda skipanina.  Talan kann eisini vera um, at keyp av einari vøru ella tænastu bindur myndugleikan til at keypa frá einum ávísum veitara, sum t.d. hevur einaumboð upp á vøruna/merkið.

*8. Bygnaðurin á marknaðinum*
Talið av veitarum og hvussu stóran marknaðarpart tey hava hvør sær, er eitt týðandi atlit tá støða skal takast til, um bjóðað verður út. Er einki ella sera avmarkað útboð av vøruni á marknaðinum, er hetta partur av samlaðu heildarmyndini tá avgerð skal takast um, hvørjar uppgávur verða kappingarútsettar.

*9. Trygd*
Tað er ábyrgdin hjá myndugleikanum, at neyðug atlit verða tikin til trygd,  tað verði seg trygd hjá starvsfólki, av upplýsingum, bygningum o.s.fr. Tískil kunnu/skulu atlit til trygd ávirka avgerðir, um uppgávur verða kappingarútsettar.

*10. Kostnaðir í sambandi við kappingarútsetan*
Ein vansi við at kappingarútseta er, at tað kann gerast sera kostnaðarmikið. Tað skal tí vera eitt passandi lutfall ímillum kostnaðir við at bjóða út og effektivisering.

*11. Møguleikar fyri at effektivisera uppgávuna*
Ein uppgáva kann verða kappingarútsett, um mett verður, at hon kann loysast meira effektivt í privata geiranum.

*12. Førleikar og førleikamenning*
Tað almenna kann hava áhuga í at varðveita kunnleika og førleikar til at útinna ávísar uppgávur og tí kann hetta vera eitt atlit, tá myndugleikin umhugsar, um uppgávur eiga at kappingarútsetast.

### 2.2.2 Atlit til starvsfólk

Í eini tilgongd, har ein myndugleiki tekur avgerð um at kappingarútseta eina uppgávu, er tað eyðsæð, at hetta kann fáa avleiðingar fyri starvsfólk. Avleiðingar av, at ein myndugleiki bjóðar eina uppgávu út kann nevniliga vera, at innihaldið í starvinum hjá starvsfólkum kann broytast. Tá hugsað verður um, at starvsfólk skulu hava eftirlit við og fylgja einum útboði, kann hetta seta nøkur øðrvísi krøv til teirra. Ein útbjóðing krevur nevniliga ávísar førleikar bæði til at fremja/hava eftirlit við einum útboði og síðani at góðskutryggja veitingina. Tí er tað sera umráðandi, at myndugleikin tryggjar sær antin, at viðkomandi starvsfólk hava neyðugu førleikarnar at fremja eitt útboð ella at uttanhýsis ráðgeving verður fingin til vega.

*Útbjóðing av uppgávum har starvsfólk flyta við út á privata geiran*
Starvsfólkaatlit er tó av enn størri týdningi, tá talan er um, at størv verða flutt út á privata geiran orsakað av einari útbjóðing. Her er umráðandi, at starvsfólk vera inndrigin í tilgongdina so tíðliga sum til ber.

Í flestu sáttmálar, Fíggjarmálaráðið hevur við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum er ein áseting,[14] sum snýr seg um umlegging av almennum virksemi. Hendan áseting ljóðar soleiðis:

*Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið[15].*

Ásetingin er grundað á donsku lógina *Virksomhedsoverdragelsesloven*[16], sum hevur til endamáls at tryggja rættindi hjá starvsfólkum, tá virksemi verður avhendað til annan at reka. Sostatt eru flestu starvsfólk hjá landinum onkusvegna vard um virksemi verður flutt út á privata geiran. Lønardeildin (Fíggjarmálaráðið) skrivar í einum notati, at

"*...nýggi arbeiðsgevarin er bundin av tí sáttmálanum, sum er galdandi tá ið hann yvirtekur. Sáttmálin bindur til sáttmálaskeiðið er runnið. Ætlar nýggi arbeiðsgevarin, at lønar- og setanarviðurskiftini skulu verða broytt, tá ið sáttmálaskeiðið er runnið skal hann boðað tí setta frá tí, við í øllum førum líka langari freist sum uppsagnarfreistin hjá tí einstaka er.*"[17]

Sostatt ber til hjá fyritøku at gera nýggja avtalu við starvsfólkið eftir, at sáttmálaskeiðið er runnið.

---

[14] Ásetingin er í antin sjálvum sáttmálanum ella í viðheftu skjølunum til sáttmálan
[15] Sí t.d. http://www.lnd.fo/Index.asp?pID={4CCF9DF7-BEC6-4C67-8709-475280715D5D}
[16] LBK nr. 710 frá 20. august 2002. Bekendtgørelse af lov om lønmodtageres retsstilling ved virksomhedsoverdragelse
[17] Fíggjarmálaráðið: Lønardeildin (2009). Starvsfólkaviðurskifti í samband við at øki verða flutt frá landinum til kommunurnar, s. 6

Sum útgangsstøðið fylgja starvsfólkini við í einari útbjóðing og skal hetta tilskiljast í útbjóðingartilfarinum

Fyri eina útbjóðing merkir hetta, at tað skal tilskilast í treytunum í útbjóðingartilfarinum, at starvsfólk sum røkja uppgávuna í løtuni eru partur av sáttmálanum og, at tey verða sett í starv hjá fyritøkjuni við somu sáttmálatreytum. Hetta er sjálvsagt ikki galdandi, har myndugleikin velur at flyta viðkomandi starvsfólk yvir á aðrar uppgávur, sum fella innanfyri teirra setunarøki. Hetta fyri at fyritøkur eru kunnaðar um tær treytir, sum eru part av grundarlagnum undir útbjóðingini.

Tað kunnu vera einstakir sáttmálar har ásetingin, sum er nevnd omanfyri, ikki er ásett. Tí verður her mælt til, at óansæð sáttmála er mannagongdin tann sama fyri øll starvsfólk.

Tað skal tó sigast um hesa áseting, at hon er heldur stutt og kann hava við sær manglandi greidleika. Tað fyriliggur heldur einki tilfar, ið beinleiðis sigur, hvussu orðingin nágreiniliga skal skiljast og umsitast. Her er danska (virksomhedsoverdragelsesloven) lógin meira útgreinað. Tí metir Lønardeildin, at danska lógin helst verður nýtt sum tulkingaríkast har ivamál stinga seg upp.

Leggjast kann afturat, at virksomhedsoverdragelsesloven er brúkt í øðrum, men atknýttum høpi í Føroyum. Í lóg um starvsfólkaviðurskifti í samband við yvirtøkur av málsøkjum [18] verður beinleiðis víst til donsku lógina og hevur hon soljóðandi áseting:

***§ 5.*** *De færøske myndigheder overtager det ikketjenestemandsansatte personale, som på tidspunktet for de færøske myndigheders overtagelse af en sag eller et sagsområde gør tjeneste inden for det pågældende sagsområde m.v. ved en dansk myndighed på Færøerne.*
*Stk. 2. De færøske myndigheder sikrer, at de pligter og rettigheder, der følger af lov om lønmodtageres retsstilling ved virksomhedsoverdragelse (virksomhedsoverdragelsesloven), finder tilsvarende anvendelse i forbindelse med den overtagelse, der er nævnt i stk. 1.*

Hjá tænastumonnum er støðan serlig. Í skjali 3 er greitt frá serligu støðuni hjá tænastumonnum.

[18] Lov nr. 528 frá 24. juni 2005 om visse personalmæssige spørgsmål i forbindelse med de færske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder

## 2.3 Útbjóðingartilgongdin

Tá avgerðin um at bjóða eina uppgávu út er tikin, eru nógv atlit at taka. Tær grundleggjandi hugsjónirnar í almenna innkeypspolitikkinum, nevnliga virði fyri pening, gjøgnumskygni og at fremja kapping skulu vera eyðsæð í allari útbjóðingartilgongdini. Harumframt, eru nøkur ítøkilig krøv, sum eru ásett í lóg[19].

### 2.3.1 Høvuðs útboðsformar

Í høvuðsheitum eru tríggjar útboðsformar hóast hesi kunnu hvør sær býtast upp í fleiri undirbólkar.

Høvuðsútboðsformarnir eru:

- Alment útboð. Allir áhugaðir partar kunnu geva eitt tilboð.
- Avmarkað útboð. Avmarkaðar skari gevur eitt tilboð[20] - ofta eftir einari undangóðkenning.
- Kappingarskend samrøða. Myndugleikin hevur samrøður við møguligar veitarar og avmarkar síðani hesar til tríggjar, sum kunnu geva tilboð uppá uppgávuna.

*Alment útboð*

Eitt alment útboð er ein útboðsformur har allir áhugaðir partar kunnu geva eitt tilboð. Tað er sostatt ikki avmarkað til útvaldar veitarar, men opið fyri øllum at geva tilboð. Við almennum útboði eigur at vera lýst í miðlum (sum t.d. bløðum, heimasíðum) og á útboðsheimasíðu, sum eftir ætlan verður tøk í 2012. Myndugleikin hevur tá skyldu til at tryggja sær, at almenna útboðið er væl lýst í viðkomandi miðlum soleiðis, at áhugaðir veitarar hava nóg góðar møguleikar at verða kunnað um útboðið.

Alment útboð er ein væl egnaður útboðsformur tá talan er um vørur/tænastur sum eru lutfalsliga líkar (standardiseraðar) t.d. pappír og har tað verður kappast uppá prís. Her eigur tað nevnliga at vera einfalt at samanbera tilboðini. Hinvegin kann eitt alment útboð eisini vera valt tí tað eru fá, sum kunnu bjóða og er tað tá ikki tørv á at frávelja tilboðsveitarar. Ein fyrimunur við almennum útboð er, at í fleiri førum er hetta tann útboðsformurin, sum í størstan mun tryggjar kappingina.

*Avmarkað útboð*

Tað eru fleiri hættir at nýta avmarkað útboð, men í flestu førum er talan um okkurt slag av undangóðkenning (prekvalifikatión). Avmarkað útboð er sera vanligt tá talan er um byggi- og annleggsverkætlanir og hevur hetta verið nýtt rættuliga nógv í Føroyum.
Ein undangóðkenning ber í sær, at fyritøkur verða góðkendar fyri síðani at kunna bjóða upp á eina verkætlan. Tær skulu vísa á, at tær lúka minstutreytir, sum verða sett umframt, at tær hava fakligu førleikarnar at veita eitt dygdargott arbeiði. Í einari undangóðkenning verða tær

[19] Sí t.d. punkt 1.3.1, 2.2.2 og 2.4.1

[20] Avmarkað útboð kann á summum økjum líkjast framíhjáboð. Báðir hættirnir avmarkað hvør kann geva tilboð uppá eina uppgávu. Tó so eru nakrir munir. Við einum avmarkaðum útboði verða øll tilboð upplatin samstundis ímeðan hetta ikki neyðturviliga er so við framíhjáboðum. Harumframt eru krøvini til framíhjáboð vanliga leysari t.d. fyriliggja tillutingarmetingarstøði ikki og er tað vanligari við samráðingum um prís tá talan er um framíhjáboð.

fyritøkur, sum ikki lúka minstutreytir fyrst sáldaðar frá.  Um neyðugt kann útbjóðarin tá skerja talið av fyritøkum við at nýta ópartísk og saklig atlit, sum t.d. við at hyggja at viðkomandi royndum hjá fyritøkunum við líknandi verkætlanum.

Ein undangóðkenning kann fara fram við at lýsa alment eftir umsóknum til undangóðkenning ella við áheitanir á fyritøkur, sum myndugleikin metir hevur førleikar at bjóða uppá verkætlanini.  Tá fyritøkur eru undangóðkendar kunnu tær bjóða uppá veitingina.

Tað kann vera sera kostnaðarmikið hjá fyritøkum at bjóða uppá størri byggi- og annleggsverkætlanir. Tí er ein fyrimunur við avmarkaðum útboði, at tað eru færri fyritøkur, sum gera tað umfatandi arbeiðið, sum krevst at veita tilboð. Harumframt, er talan um, at einans tær fyritøkur sum veruliga kunnu gera arbeiðið eru við í metingini.

*Kappingarkend samrøða*
Tann triðji høvuðs útboðsformurin er kappingarkend samrøða. Hetta er tann formurin, sum verður minst nýttur, tí hann er best hóskiligur til heilt truplar og samansettar verkætlanir. Í kappingarkenda samrøðu hevur myndugleikin samrøður við møguligar veitarar og kann síðani avmarkað talið av veitarum í so fall, at hetta er nóg mikið at fremja kappingina. Myndugleikin skal síðani í framhaldandi samrøðum biðja fyritøkurnar lýsa, hvussu teir ymsu partarnir av veitingini kunnu loysast. Tá myndugleikin hevur nóg mikið av upplýsingum/uppskot til loysnir fyri at lýsa og avmarka verkætlanina kann arbeiðið vera boðið út millum somu fyritøkur, sum hava verið við í samrøðunum. Tað skal viðmerkjast, at hóast talan eru um áhaldandi samrøður við fyritøkur er "sjakring" bannað. Sjakring er ein mannagongd har myndugleikin, eftir at tilboð eru komin inn, letur upp fyri møguleikanum at broyta tilboð og fer sostatt inn í samráðingar við nakrar fyritøkur um t.d. at broyta prísin.

Í ES verður hesin formur einans nýttur í heilt serligum førum. Her kann talan vera um uppgávur, sum eru sera truplar at lýsa t.d. tí myndugleikin ikki hevur møguleika at vita, hvussu uppgávan verður loyst tekniskt ella tí tað ikki ber til at greina váðabýti ella fíggjarliga samansetingin av uppgávuni.

### 2.3.2 Val av útboðsformi
Tá myndugleikin skal bjóða út eina veiting ella eina verkætlan, er tað av stórum týdningi, at útboðsformurin passar til ítøkiligu uppgávuna. Ein útbjóðing setur krøv til førleikar hjá øllum pørtum, bæði hjá tí almenna og hjá vinnulívinum, tí er tað ráðiligt at myndugleikar í tann mun tað er gjørligt, halda seg til útbjóðingarformar, sum eru royndir í Føroyum og sum hava víst seg at virka. Hetta fyri, at ráð/stovnar og privata vinnulívið kunnu menna sínar førleikar við útbjóðingum. Tískil skulu vera halgóðar orsøkir til at royna nýggjar útboðsformar.

Sum meginregla verður mælt til at nýta alment útboð ella innboðin útbjóðing við almennari undangóðkenning.

Tá støða skal takast til hvør útboðsformur verður brúktur, skal serliga takast atlit til kappingina, fjøltætni í uppgávuni, bygnaðin á marknaðinum og umsitingarliga byrðan, sum stendst av útboðnum. Hesi atlit verða nú viðgjørd.

*Atlit til kapping*

Tað almenna hevur skyldu at fremja kapping á marknaðinum og hetta bæði tá talan er um kapping í nærmastu framtíðina, men eisini kappingina langt frammi í tíðini. Her skal havast í huga, at um ein uppgáva (t.d. við rammusáttmála) verður boðin út, er tað umráðandi at sáttmálatíðin verður hildin niðri á einum rímiligum støði soleiðis, at kappingarneytar enn eru eftir á marknaðinum tá sáttmálaskeiðið er runnið.

*Fjøltætni í uppgávuni*

Nakrar uppgávur eru av natúru meira samansettar enn aðrar og krevja breiðari førleikar at loysa tær. Eitt nú kann talan vera um, at fleiri fakbólkar skulu loysa eina uppgávu t.d. við einari størri byggiverkætlan har tørvur er á fólki við førleikum innan arkitekur, verkfrøði, el, rørinnlegging osfr. Her kann tað vera passandi at nýta undangóðkenningarmannagongdina, har myndugleikin við almennari lýsing heitur hetta á fyritøkur um at søkja um undangóðkenning.

*Bygnaðurin á marknaðinum*

Áðrenn ein myndugleiki bjóðar eina uppgávu út er neyðugt at kenna til bygnaðin á marknaðinum. Bygnaðurin á marknaðinum hevur ávirkan á, hvussu ein velur at bjóða út – ella um útbjóðingarhátturin yvirhøvur skal verða nýttur.

Um bert tveir veitarar eru á einum marknaðin kann eitt uppgáva  bjóðast út. Hetta hevur verið  roynt við góðum úrslitum. Hinvegin, har tað bert eru tveir veitarar á marknaðinum, kann tað í ávísum førum vera ráðilig at myndugleikin biður um framíhjáboð frá fyritøkunum á marknaðinum heldur enn at bjóða uppgávuna út.

Tó so, skal myndugleikin eisini hava atlit til kapping og tá kann  vera ráðiligt at bjóða út alment í Føroyum og í summum førum eisini aðrastaðni. Hóast fáir veitarar eru á einum marknaði kann eitt alment útboð eggja fyritøkur at samstarva fyri síðani at gerast kappingarførur veitari á marknaðinum. Við øðrum orðum, um møguligar framtíðar veitarar ikki vita av, at eftirspurningurin er til staðar hava tær ikki møguleika at gera vart við seg. Tí eiga almennir myndugleikar ikki neyðturviliga at ganga út frá, at tær eru vitandi um allar hugsandi veitarar.

*Umsitingarliga arbeiðsbyðran*

Útbjóðingar kunnu vera sera krevjandi fyri almennu umsitingina og er hetta ikki einans galdandi fyri tað arbeiðið, sum stendst av sjálvari útbjóðingini inntil ein veitari tekur við uppgávuni. Tá ein uppgáva er bjóðað út setur hetta eisini krøv til, at fólk eru tøk at fylgja veitingina, áhaldandi góðskutryggja hana og annars gera tær uppgávur sum eru neyðugar av tí, at myndugleikin framvegis hevur ábyrgd av uppgávuna. Tí er sera umráðandi, at atlit verður tikið til umsitingarligu byðruna fyri almennar myndugleikar tá útbjóðingarformurin verður valdur.

### 2.3.3 Kunning av útboðum og nýtslu av miðlum

Tað skal vera møguligt hjá viðkomandi pørtum at kunna seg um útbjóðingar. Myndugleikin skal sostatt tryggja sær, at eitt alment útboð er nóg væl lýst. Í føroysku útbjóðingarlógini

(licitationslógin)[21], sum er galdandi fyri byggivirksemi er ein áseting um, at almenn útbjóðing skal lýsast í “...bløðunum ella á líknandi hátt...” (§ 2, stk. 3).

Í dagsins samfelagi, har nógvir miðlar eru í at velja, harímillum elektroniskir miðlar, er kunningin til borgaran samansett við eina røð av ymsum miðlum. Tað viðførir, at samfelagið er í minni mun tengt at dagbløðum og tí er tað ikki neyðturviliga nóg mikið at lýsa við útbjóðingum í dagbløðum. Tað er tí ráðiligt, at eisini aðrir miðlar verða nýttir til at upplýsing um almenn útboð. Her verður sett sum minsta krav, at uppgávur, sum eru bodnar út eru lýstar á útboðsheimasíðuni, sum varð umrødd í fyrsta parti (innkeypspolitikk) tá hendan heimasíðan er klár. Harumframt verður mælt til, at eisini aðrir miðlar verða nýttir so sum dagbløð, heimasíða hjá viðkomandi stovni og kunning umvegis Vinnuhúsið.

## 2.4 Útbjóðingartilfar

Tá ein uppgáva verður boðin út eigur útbjóðingartilfarið at vera væl umhugsað og sera neyvt. Tann, sum skal veita tilboð skal hava møguleika at seta seg væl inn í uppgávuna. Hetta er eisini umráðandi fyri myndugleikan, tí óneyvt útbjóðingartilfar førur við sær ógreið tilboð, sum ger tað sera trupult at samanbera innkomin tilboð. Harumframt, er tað sera ónøktandi hjá fyritøkum at hava fyri neyðuni at “gita” seg fram til smálutirnar í uppgávuni.

Tað er eingin ivi um, at gjøgnumarbeitt og neyvt útbjóðingartilfar setur stór krøv til útbjóðaran. Um neyðugt eigur útbjóðarin at fáa yrkisliga ráðgeving/hjálp at gera tilfar. Hetta er vanlig mannagongd við stórum og ógreiðum verkætlanum, sum t.d. innan byggi- og annleggsvirksemi, har byggirráðgevar projektera verkætlanir. Útbjóðarin eigur eisini, um tey eru óroynd at bjóða út, at fáa ráðgeving ella samstarva við aðrar myndugleikar, sum hava viðkomandi førleikar ella royndir.

Fyri at gera útbjóðingartilfar krevst, at ein røð av viðkomandi stig eru umrødd og greinað. Hesi eru bólkað í 1) innihaldið í útbjóðingartilfarinum, 2) val av metingarstøði, 3) góðskutrygging, 4) val av veitara og 5) mál í útbjóðingartilfari og tilboði. Hesi verða nú viðgjørd.

### 2.4.1 Innihald í útbjóðingartilfarinum

Bygnaðurin í útbjóðingartilfarinum kann vera sera ymiskur og broytist eisini ímillum vinnur. Harumframt er innihaldið í útbjóðingartilfarinum eisini nær tengt at útboðsforminum. T.d. har fyritøkur eru undangóðkendar, er tilfarið sera neyvt soleiðis, at fyritøkurnar vita niður í smálutir hvussu nógv tilfar skal nýtast og hvat góðskustøðið skal vera. Tí skal útbjóðarin tryggja sær, at samsvar er millum útboðsformin og útbjóðingartilfarið.

Hóast tað er ein røð av viðurskiftum, sum ávirkar innihaldið í útbjóðingartilfarinum og neyvleikan í upplýsingunum eru tað fleiri grundleggandi upplýsingar, ein møguligur veitari eigur at vita.

[21] Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing

| Teir mest týðandi upplýsingarnar í útbjóðingartilfarinum eru: |
| --- |
| • Ein frágreiðing um uppgávuna sum heild |
| • Treytir sum verða sett tilboðsgevarar |
| • Kravfesting av uppgávuni |

- *Ein frágreiðing um uppgávuna sum heild*: Orsøkina/bakgrundina til, at uppgávan verður bjóðað út kann vera sera viðkomandi fyri tilboðsgevarar. Harumframt kann tað geva tilboðsgevarar eina betri heildarmynd um nakrir upplýsingar fyriliggja um myndugleikan. Uppgávan eigur at vera lýst í stuttum í byrjanini av útbjóðingartilfarinum. Hetta gevur fyritøkuni møguleika at gera eina skjóta meting um tey eru áhugaði at kunna seg nærri um uppgávuna. Seinni í tilfarinum eigur uppgávan at vera lýst meira neyvt. Lýsingin er sjálvandi tengd at, hvat slag av uppgáva talan er um, men ein neyvari lýsing fyri eina tænastuveiting kann t.d. greiða frá:
    - Støddina av veitingini
    - Hvar (geografiskt) veitingin skal fara fram
    - Hvørjar almennar myndugleikar tilboðsgevaran skal samstarva við og, um nakrar, hvørjar fyritøkur
    - Hvussu langt tíðarskeið veitingin skal fevna um
    - Lógarheimild fyri veitingina

- *Treytir, sum vera settar til tilboðsgevarar*: Tær treytir, sum útbjóðarin setur til tey, sum bjóða, hava samband við bæði tey praktisku viðurskiftini umframt onnur meira grundleggjandi viðurskifti. Tað er umráðandi, at útbjóðarin hevur øll viðkomandi krøv við í útbjóðingartilfarinum. Hinvegin, skal útbjóðarin eisini tryggja sær, at krøvini sum verða sett fyritøkum eru møgulig (realistisk). Eitt nú er týðandi, at krøvini ikki eru hægri enn neyðugt soleiðis, at ávísar fyritøkur óneyðugt verða útihýstar frá útbjóðingini.
    - Treytir, sum vera sett um praktisk viðurskifti eru t.d.
        - Tíðarfreistir (nær tilboð skulu latast inn, nær seinasta freist er at seta spurningar um útbjóðingartilfarið, nær úrslitið verður almannakunngjørt)
        - Hvar og í hvørjum líki tilboðið skal lastast inn og hvussu nógv eintøk (um talan er um tilboð í pappírsformi)
        - Hvar tilboðsgevarar kunnu venda sær við spurningum
        - Um nakrar útreiðslur vera áløgd tilboðsgevarum
        - Um tilboðsgevarar kunnu vera til staðar tá tilboð vera upplatin og viðgjørd
        - Hvussu og hvar tilboðsveitarar kunnu kæra um avgerðir í samband ivið val av veitara
        - Bankatrygd
    - Treytir í samband við útboðnum er t.d.
        - Útbjóðingarformurin
        - Úrvalsmetingarstøði (við undangóðkenningum)
        - Tillutingarmetingarstøði (metingarstøði fyri val av veitara)
        - Um alternativ boð kunnu gevast
        - Um/nær kunnandi fundir vera í samband við útbjóðingini
        - Um nakrar serligar treytir eru við útbjóðingini t.d. serlógir ella um serlig krøv er til eitt nú tilfar ella umhvørvisatlit
    - Útbjóðarin eigur at upplýsa um møguligar viðkomandi serlógir, sum eru galdandi fyri útbjóðingina, har hesi eru umframt vanligar almennar lógir, so sum

útbjóðingarlógin og aðrar almennar lógir. Harumframt, skal upplýsast um ítøkiligar ásetingar í útbjóðingartilfarinum. Hesar eru:

- Løgtingslóg nr. 98 frá 20. juni 1995 um at avmarka møguleikar hjá skuldarum, at taka lut í útbjóðingum hjá tí almenna.
- Rundskriv um arbeiðsklausular í sáttmálum um tænastu- og byggiarbeiði hjá tí almenna[22]

- *Kravfesting av uppgávuni*: Um ein uppgáva verður bjóðað út á fyrsta sinni kann arbeiðið at áseta metingarstøði verða umfatandi. Endamálið við kravfestingini er, at tilboðsveitarar fáa eina greiða mynd av innihaldinum í uppgávuni og ikki minst góðskustøðið, sum verður kravt. Sostatt er hetta ein avgerandi partur av útbjóðingartilfarinum. Krøv kunnu setast til sjálva veitingina, men talan kann eisini vera um krøv, sum hava eitt óbeinleiðis samband við veitingina. Tey ymsu krøvini eru sjálvsagt neyvt tengd at, um talan er um eina vøru/tænastu ella byggi- og annleggsverkætlan. Tað er tó umráðandi, at krøvini eru viðkomandi og neyðug. Hyggja vit eftir ymisk krøv kunnu hesi býtast í krøv til sjálva veitingina og onnur krøv.
  - Krøv til sjálva veitingina kunnu eitt nú vera:
    - Mongd, góðska, dagfesting fyri veiting
    - Hvørji minstakrøv eru til t.d. teknisk krøv, umhvørvisatlit og tilfar
    - Møgulig minstakrøv til arbeiðsgongdini t.d. hvørji tól og maskinur verða nýtt
    - Um talan er um keyp av vøru ella tænastu hvørji minstakrøv eru til tænastustøði
    - Krøv til veitingartrygd ella tænastu- og eftirlitssáttmálum t.d. við keyp av teldum
  - Onnur krøv til veitaran kunnu eitt nú vera:
    - At veitarin hevur ávísar trygginar.
    - Hvussu klagur frá brúkarum (t.d. um talan er um eina tænastuveiting) vera handfarin
    - Krøv til arbeiðsklæðir
    - Krøv til útbúgvaringarstøði á starvsfólkum
    - Krøv til handfaring av undirveitarum

### 2.4.2 Val av metingarstøði

Tá ein uppgáva verður bjóðað út, er ein tann mest grundleggjandi spurningurin hvørji metingarstøði skulu nýtast fyri at gera av, hvør veitari verður valdur. Metingarstøði eru tey yvirskipaðu krøvini, sum útbjóðarin ásetur. Hesi krøv eiga at vera vekta soleiðis, at tilboðsgevarin og útbjóðarin veit, hvussu metingin skal sundurbýtast. Ynskiligt er, at ein vekting verður gjørd við at áseta nøgd t.d. prosent. Í teimum førum, har hetta ikki ber til eigur ein vekting í allar minsta lagi at greitt frá sum t.d. "av stórum týdningi", "av minni týdningi" osfr. Harumframt, verður útbjóðingarmannagongdin meira gjøgnumskygd, saklig og álitsvekjandi.

[22] Rundskriv um arbeiðsklausular í sáttmálum um tænastu- og byggiarbeiði hjá tí almenna, http://www.vmr.fo/Default.aspx?ID=6855&PID=10187&NewsID=1918

Metingarstøði eiga at vera vekta og skal vektingin upplýsast í útbjóðingartilfarinum.
Tvey sløg av metingarstøði vera nýtt fyri at meta um tilboðsgevarar

- Úrvalsmetingarstøði – verða nýtt at velja út fyritøkur í einari undangóðkenning
- Tillutingarmetingarstøði – verða nýtt at velja endaliga veitara t.v.s. tá sáttmálin verður tillutaður

*Úrvalsmetingarstøði*
Úrvalsmetingarstøði verða nýtt við undargóðkenningar, serliga í byggi- og annleggsverkætlanum og hava til endamáls at velja tær fyritøkur út við bestu førleikum at gera uppgávuna. Úrvalsmetingarstøði kunnu sostatt vera t.d. krøv til fíggjarligu og tøkniligu orkuna hjá fyritøkuni og royndir við líknandi verkætlanum. Dømi um úrvalsmetingarstøði eru:

- Inntøka/vinning seinastu trý árini
- Skuldarbyrða
- Útbúgvingarstøði hjá starvsfólkum, sum eru knýtt at verkætlanini
- Viðkomandi royndir hjá fyritøkuni
- Yvirlit yvir amboð og tøknuliga útgerð
- Frágreiðing um góðskutrygging

*Tillutingarmetingarstøði*
Tillutingarmetingarstøði, hinvegin, eru grundarlag undir endaliga val av veitara og kunnu eii nú vera grundað á lægsta prís ella hægst virði fyri peningin. Tá talan er um byggi- og annleggsverkætlanir sum eru fevndar av galdandi útboðslóg, er í núverandi lóggávu einans loyvt at nýta lægsta prís sum tillutingarmetingarstøði.. Tað er tó neyðugt, at hægst virði fyri pening má býtast up soleiðis, at tilboðsgevarin veit, hvat hetta merkir í tí ítøkjuligu útbjóðingini. Dømi um hetta eru:

- Rakstrarkostnaðir
- Prís
- Góðskutrygging
- Veitingartrygd
- Rakstrartrygd
- Tænastuveitingar

Metingarstøði, sum kunnu haldast at gera mismun og vera ósaklig (t.d. einans veitarar frá staðnum) eru ikki loyvd.

### 2.4.3 Góðskutrygging

Hóast ein uppgáva verður bjóðað út, er tað almenni myndugleikin, sum framhaldandi hevur ábyrgd av veitingini. Tað er tí neyðugt, at ein góðskutrygging er greitt avtalað við veitara. Hvørji krøv verða sett til veitaran um góðskutryggingarskipan eigur eisini at vera skrivað inn í útbjóðingartilfarið. Góðskutrygging skal umfatað veitarans eftirlit við góðskuni, men eisini skal myndugleikin gera sær greitt hvussu tað hevur eftirlit við veitingini. Hetta kann t.d. vera við at gera stakroyndir, brúkarakanningar ella viðgerð av klagum. Umframt eina ætlan fyri góðskutrygging skal ein sáttmáli innihalda framferðarhátt hesum viðvíkjandi og um nøkur fylgja skal standast av trupuleikum við góðskuni á veitingini.

**2.4.4 Val av veitara**

Hesin partur av útbjóðingartilgongdini snýr seg um at taka avgerð um, hvør veitari endaliga vinnur útboðið. Eins og í allari tilgongdini, er eisini neyðugt í hesum partinum av útbjóðingini at vera neyvur, nærlagdur og hugsa um smálutir. Tað eigur at vera tilskilað í útbjóðingartilfarinum hvar og hvussu tilboð skulu latast inn og hvat frámerki skal vera á brævbjálvanum. Harumframt er umráðandi, at í teimum førum, har tilboðsveitarar sjálvir lata eitt tilboð inn til bústaðin hjá myndugleikanum, at tey fáa eina kvittan fyri móttøkuna.

Fyri at skapa gjøgnumskygni, er tað av stórum týdningi, at myndugleikin er reglubundin og viðger tilboðsveitarar eins.

Tá veitari skal veljast skulu øll hava eins viðfer. Tað merkir t.d. at

- Har fyrispurningar eru um útbjóðingartilfarið eiga allir veitarar fáa útflýggjað upplýsingar, sum verða latnar út til ávísan tilboðsgevara. Annar møguleiki er at skipa fyri almennum fundi, har tilboðsgevarar kunnu seta spurningar og fáa greiðu á viðurskiftum í útbjóðingartilfarinum.
- Evstamark fyri at lata inn tilboð verður yvirhildið og tey tilboð, sum eru ov sein, eiga at verða burturvíst. Hetta er umráðandi fyri at meginreglan um eins viðferð av veitarum verður hildin. Við øðrum orðum, skulu øll lata inn til tíðina og ikki bert nøkur.
- Treytirnar, sum eru settar í útbjóðingartilfarinum, skulu yvirhaldast.
- Tilboð eru afturlatin og eru í trúnaði inntil freistin er farin.

Í verandi lóggáva á byggi- og annleggsøkinum (útbjóðingarlógini) eru ásetingar um, at boð sum eru latin, skulu latast upp eina ásetta tíð og tey, sum hava boðið, hava rætt at vera hjástødd. Tó so er í lógini onkur undantøk til hesa áseting.

Tá ein útbjóðing er so opin og gjøgnumskygd, sum til ber, er tað eyðsæð, at tey, sum hava boðið, hava størri álit á myndugleikan, at alt er farið rætt og sakliga fram. Tí verður viðmælt, at í øllum førum har tað er møguligt, at tilboð verða latið upp alment. Tað, at tilboð verða latin upp, er tó ikki annað enn ein almannakunngerðing av teimum, sum hava latið tilboð. Avgerðin eigur at vera tikin bert tá viðkomandi partar, og møguligir serfrøðingar, hava havt høvi at kanna tilboðini neyvt.

Tilboð skulu gjøgnumgangast og myndugleikin skal tryggja sær, at tilboðsveitararnir lúka tær treytir, sum eru settar í útbjóðingartilfarinum. Í teimum førum, har tilboð eru innlatin, sum ikki lúka treytirnar, skulu hesi sáldast frá og eigur veitarin at fáa boð um hetta við einari grundgeving sum skjótast. Um myndugleikin  ivast um eitthvørt í tilboðnum kunnu hesi seta seg í samband við tilboðsveitaran fyri at fáa svar uppá hetta. At venda sær til tilboðsveitaran við tí fyri eyga at fáa greiðu á einhvørjum skal bert koma fyri um tað er haldgott grundarlag at seta spurning til tilboðsveitaran.

Tá talan er um prísáseting, er tað skyldan hjá myndugleikanum at taka atlit til møgulig fyrivarni í tilboðnum og gera eina meting um, hvør kostnaður kann standast av hesum fyrivarnum. Í byggi- og annleggsuppgávum er vanligt at nýta sokallaðu ABF06 treytirnar og tá eru reglur um fyrivarni, sum havavið sær, at allir partar taka støði í somu treytum og

fyrivarnum. ABF06 treytirnar forða ikki tilboðsgevari kann taka fyrivarni, men tá verða hesi kapitlaiserað av byggiharranum og metti kostnaðurin av hesi lagdur oman á tilboðsprísin.

Ein myndugleiki má ongantíð seta seg í samband við ein tilboðsveitara um ein prís, tí hetta kann skiljast sum ein roynd at ávirka prísin. Harumframt er tað ikki loyvt at seta seg í samband við tilboðsveitarar við tí fyri eyga at leggja trýst á tey um viðurskifti, sum á annan hátt kunnu ávirka samlaða prísin. Sostatt er tað bert loyvt at samskifta við tilboðsveitarar, um tað er neyðugt t.d. við einari neyvlýsing av viðurskiftum í tilboðnum – og hetta bert um hetta er í tráð við grundregluna um eins viðferð av tilboðsveitarum.

Síðani skulu tilboðini kannast sambært metingarstøði, sum er tilskilað í útbjóðingartilfarinum. Um metingarstøði er *lægsti prísur* samanber myndugleikin prísir og tekur hædd fyri møguligum fyrivarni og eyka veitingum, sum eru tilskilað í tilboðnum.

Har talan er um onnur metingarstøði kann t.d. gevast stig fyri hvørt av teimum tilskilaðu metingarstøðunum og tann, sum hevur flest stig, vinnur uppgávuna. Harumframt kann tað vera neyðugt at viga stigini soleiðis, at tað metingarstøði, sum hevur størst týdning, vigar mest. Tílíkar vektingar eiga at vera tilskilaðar í útbjóðingartilfarinum.

Tá talan er um keyp av vørum og tænastum, verður mælt til, at ein myndugleiki letur tíggju dagar ganga frá tí, at avgerð er tikin um, hvør veitari hevur vinnandi boð, og allir tilboðsveitarar eru kunnaðir um avgerðina, til ein sáttmáli verður undirskrivaður. Hetta fyri at geva øðrum tilboðsveitarum møguleika at kæra avgerðina, og geva kærumyndugleikarnum møguleika at taka avgerð um at geva kæruni uppsetandi virknað, til endalig avgerð er tikin. Í tílíkum førum kann ein myndugleiki áseta í útbjóðingartilfarinum, at tey tilskila sær rætt at gera ein fyribilssáttmála við vinnandi veitaran fyri at tryggja sær áhaldandi veiting til málið er avgreitt.

**2.4.5 Mál í útbjóðingartilfari og í tilboði**

Tungumálið í útbjóðingartilfarinum er lýst í fyrsta parti um innkeypspolitikk. Greitt varð frá, at útbjóðingartilfar eigur at vera á føroyskum, men kann eisini vera á útlendskum máli. Hetta um tað verður mett, at nøktandi kapping ikki kann fáast uttan at bjóða uppgávuna út uttanfyri Føroyar. Harumframt skvera gjørligt at lata inn tilboð á føroyskum máli.

Ein myndugleiki kann hava fyri neyðini at tilboðini og/ella útbjóðingartilfarið verður umsett til eitt annað mál, eitt nú um serfrøðingar skulu meta um tilboðini. Í tílíkum førum er tað ábyrgdin hjá myndugleikanum at fáa hetta í lag og bera kostnaðin av møguligum umsetingum.

## Skjal 1: Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing

Føroyska lisitatiónslógin kom í gildi 1. januar 1985 og hevur verið í gildi óbroytt síðan tá. Ásetingarnar í løgtingslógini eru við einstøkum undantøkum tær somu, sum í táverandi donsku lisitatiónslógini, sum var galdandi frá 1967 til 2001, tá nýggj lóg *Om indhentning af tilbud i bygge- og anlægssektoren (tilbudsloven)* kom í gildi.

Orsøkin til, at serligar licitatiónsreglur vórðu gjørdar fyri byggi- og annleggsøkið í Danmark er søgulig. Áðrenn danska lisitatiónslógin kom í gildi var ein praksis fyri kappingaravmarkandi atferð millum aktørarnar á byggi- og annleggsmarknaðinum, sum tað var torført at broyta við táverandi monopollóg[23]. Hetta merkti, at lisitatiónirnar, heldur enn at virka kappingarfremjandi, virkaðu kappingaravmarkandi[24].

Í almennu viðmerkingunum til fyrstu tilboðslógina varð upplýst, at produktiviteturin í donsku byggivinnuni vaks spakuligari enn í øðrum vinnum, og at kostnaðarstøðið lá uml. 15-20% omanfyri tey lond, sum Danmark vanliga samanber seg við. Ynski var tí um at fremja eina meira virkna kapping.

Lýsing av Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing:
§ 1: Virkisøki
Ásetir, at lógin er galdandi fyri innheinting av boðum uppá arbeiðir og veitingar innan byggivirksemi, tó ikki skipabygging. Í lógaruppskotinum, sum varð løgd fyri Løgtingið, var ætlanin at lógin eisini skuldi verða galdandi fyri skipabygging og fyri arbeiði og veitingar við tilknýti til byggivirksemi. Hesar serføroysku ásetingar vóru tó strikaðar undir viðgerðini í Løgtinginum, so ásetingin gjørdist meinlík teirri donsku.
Lógin er bæði galdandi fyri útbjóðingar hjá tí almenna og tí privata.

§§ 2-3 : Allýsing av útbjóðing og manngongdir tá bjóðað verður út
Fyri at talan skal vera um útbjóðing eftir lisitatiónslógini skulu arbeiði og veitingar verða bodnar út til fleiri, og við hesum treytum:

1) Talan skal vera um somu tíðarfreist
2) Sama útbjóðingartilfar sum grundarlag
3) Tey, ið bjóða skulu geva bindandi, skrivlig boð
4) Tað skal í sambandi við útbjóðingina verða upplýst, at eisini onnur hava fingið høvi at bjóða

Krøv til útbjóðingartilfarið: Um tað í útbjóðingartilfarinum verður biðið um serlig tilboð, skal tað greitt verða ásett, hvørjar av hesum upphæddum tilsamans eru kappingargrundarlagið.
Krøv til lýsing/innbjoðing: Almenn útbjóðing skal lýsast í bløðunum uttan nakra avmarking á, hvør kann bjóða. Við innbodna lisitatión skal áheitanin sendast beinleiðis til tey, ið ein ynskir at fáa boð frá

Krøv til innlating av boði: Boð skulu latast inn í afturlatnum brævbjálva, sum verður opnaður til áður ásettu tíð. Tey sum hava boðið hava rætt til at verða hjástødd.

---

[23] Almennar viðmerkingar til *Forslag til lov om indhentning af tilbud i bygge- og anlægssektoren* (2000/1 LSF 140)
[24] Hørlyck, Erik (1982): p. 373. Entreprise og licitationsbetingelser. Juristforbundets forlag.

§ 4: Viðgerð av innkomnum boðum
Um útbjóðingin er almenn, hevur útbjóðarin rætt til at velja frítt millum øll innkomnu boðini ella at hava øllum. Orsøkin til hetta er, at útbjóðarin tá onga ávirkan hevur á, hvør bjóðar. Um tann, ið hevur lægsta boð t.d. er kapitalveikur ella lítlar og ongar royndir hevur, kann tað geva útbjóðaranum orsøk til at velja annað tilboð enn tað lægsta. Vanligir rættargrundsetningar um saklig atlit, eins viðgerð v.m. avmarka tó í hvønn mun útbjóðarin kann velja frítt millum innkomnu boðini.
Um talan er um innbodna lisitatión, hevur útbjóðarin skyldu til, um ikki annað greidliga er tilskilað í útbjóðingarskrivinum", at taka við lægsta boði ella at havna teimum øllum. Orsøkin til hetta er, at útbjóðarin sjálvur hevur valt út fyritøkurnar, ið eru bidnar um at bjóða, og at tað tí má roknast við, at fyritøkurnar eru førar fyri at taka á seg uppgávuna.

Spurningurin er so, hvat tað ber til at tilskila í útbjóðingarskrivinum. Spurningurin er serliga, um onnur metingarstøði enn prísur (eitt nú kvalitetur, estitikkur, umhvørvi) verða løgd til grund fyri val av veitara, so at metingarstøði kemur at líkjast tí búskaparliga besta tilboði.

Tá lógaruppskotið varð lagt fyri Løgtingið, varð skotið upp at áseta, at um talan var um innbodna lisitatión, skuldi útbjóðarin antin taka av lægsta tilboðnum ella havna øllum tilboðum. Hetta varð broytt undir viðgerðini í Løgtinginum, so útbjóðarin fekk møguleika at tilskila annað í útbjóðingarskrivinum. Henda ásetingin gjørdist sostatt meinlík teirri donsku. Spurningurin er so, um Løgtingið hevur ætlað, at onnur metingarstøði enn prísur kunnu nýtast til at avgera tillutanina av sáttmálanum. Í viðmerkingunum til broytingini av § 4, stk. 2 skrivar nevndin, at reglan um, at ein altíð skal taka við lægsta boði í bundnari lisitatión verður tvørlig at umsita, tí at tað vegna gjørd fyrivarni ofta er trupult at avgera, hvat tilboð er lægst. Nevndin heldur víðari, at um ein ikki ynskir at taka av lægsta boðnum, er ein noyddur at havna tey øll, og kemur tað at seinka arbeiðinum.

Tað er ikki heilt greitt, hvussu viðmerkingarnar hja nevndini skulu skiljast, men tað má roknast við, at nevndin hevur ætlað, at galdandi regla skuldi verða tann sama sum í donsku tilboðslógini. Nevndin skrivar, at hon hevur haft fund við Verkfrøðingafelagið, sum heur mælt frá at gera broytingar í mun til donsku lógina. Tað er sostatt nógv sum bendir á, at ætlanin hjá nevndini hevur verið at føroyska rættarstøðan skuldi verða lík teirri donsku.

Tað tykist ikki heilt greitt hvat lógliga kann tilskilast í útbjóðingarskrivinum. Hvørki kommenteraða lisitatiónslógin ella vegleiðingin hjá Håndværksrådet um gomlu donsku tilboðslógina taka greitt støðu til henda spurning, tó at kommenteraða lisitatiónslógin í einum einstøkum setningi staðfestir, at kappingargrundarlagið við innbodnari lisitatión eru tilboðsprísinir[25].

Vanliga fatanin, m.a. í viðmerkingunum til fyrstu tilboðslógina, er tó, at tað ikki ber til at nýta tað búskaparliga besta tilboðið sum metingarstøði fyri val av veitara. Sostatt tykist tað verða greitt, at tað eru mørk fyri, hvat kann tilskilast í útbjóðingarskrivinum í sambandi við eina innbodna lisitatión eftir lisistatiónslógini, tó at tað ikki er líka greitt, akkurát hvar hetta

[25] Hørlyck, Erik (1982): p. 373. Entreprise og licitationsbetingelser. Juristforbundets forlag.

merkið gongur. Av tí at rættarstøðan ikki er heilt greið, kann tað vera tørvur á at fáa presiserað hesa greinina í lisitatiónslógini.

§ 5: Krøv til tey, ið bjóða
Krøv verða sett um, at tað er bannað frammanundan at javna boð, t.e. at tey ið bjóða frammanundan samstarva um innihaldið í boðunum. Dømi um hetta kundi verið at nýta somu tímaprísir, somu takstir fyri svinn o.s.fr.
Eisini er bannað at seta treytir um upplating av boðum, eitt nú at tilboðini bara kunnu latast upp, um organiseraði feløg bjóða.
Harafturat er bannað at taka boð burturúr, eitt nú um bransjufeløgini meta hesi at verða "ov lág". Hetta var annars vanlig praksis, áðrenn danska lisitatiónslógin kom í gildi.
Endiliga er bannað at gera avtalur, sum áleggja teimum, ið bjóða frammanundan at boða yrkisfeløgum frá boðum, ella skyldu hjá bjóðandi at tingast um boðini. Hetta eru viðurskifti, sum høvdu verið fevnd av kappingarlógini í dag. Loyvt er at hava fund um spurningar í s.v. útboðstilfarið, um útbjóðarin eisini er til staðar.

§ 6: Framíhjáboð
Í hesari greinini verða krøv sett til framíhjáboð. M.a. er ásett, at tað ikki kann takast ímóti framíhjáboðum innan 6 mánaðir frá tí, at ein áður uppá sama arbeiði hevur fingið útbjóðingarboð ella meira enn eitt framíhjáboð. Eisini er tað ein treyt fyri at bjóða sama arbeiði út av nýggjum, at fyrra útbjóðingin er tikin aftur, og hetta skrivliga er fráboðað teimum, ið hava bjóðað.

Harumframt varð henda greinin í donsku lisitatiónslógini tulkað soleiðis av táverandi danska Monopoltilsyn, at hon forðar fyri at móttaka meira enn tvey framíhjáboð. Hetta er ikki greitt ásett í sjálvum lógartekstinum, men býarrætturin í Herning er komin til somu niðurstøðu sum Monopoltilsynet[26].

Av tí, at einsljóðandi áseting er í føroysku lisitatiónslógini má roknast við, at henda skal tulkast á sama hátt sum í Danmark, hóast orðingin í lógini ikki greitt tilskilar í mesta lagi tvey framíhjáboð.

§ 7: Aðrar lógir
Ásett verður í hesi grein, at ásetingar í løgtingslóg um prístal og løgtingslóg um vinnu verða verandi í gildi. Løgtingslóg um prístal er farin úr gildi, og nýggj løgtingslóg um vinnu er sett í gildi í 2001. Henda greinin eigur tí av røkisligum ávum at verða strikað.

§ 8: Revsiásetingar
Ásett verður m.a. at brot á lógina verða revsað við bót ella hefti, um ikki harðari revsing er uppiborin eftir revsilógini. Tørvur er á at dagføra revsiásetingarnar, m.a. tí hefti ikki longur verður nýtt sum revsiháttur.

[26] Ibid: s. 424

## Skjal 2: Hoyvíkssáttmálin

Við Hoyvíkssáttmálanum frá 2005 gjørdust Føroyar og Ísland eitt felags búskaparøki. Hetta merkir, at tað við ávísum undantøkum er fríur flutningur av vørum, tænastum, arbeiðsmegi og kapitali millum londini bæði. Tað er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkis- ella framleiðslustað.

Grein 5, nr. 2, litra I í sáttmálanum ásetur at "allur mismunur í sambandi við alment innkeyp, í lóg sum í verki, skal vera bannaður." Hetta merkir, at tað ikki ber til at taka atlit til tjóðskap, virkis- ella framleiðslustað í sambandi við alment innkeyp. Gev gætur, at hetta bert er galdandi fyri alment innkeyp, og ávirkar sostatt ikki ikki innkeyp hjá privata sektorinum.

Hoyvíkssáttmálin kann fatast sum ein røð av alment galdandi prinsippum, sum í hvørjum einstøkum føri mugu tulkast í sambandi við ítøkiliga málið. Í sambandi við alment innkeyp snýr tað seg tí um at gera eina meting, nær mismunur verður gjørdur vegna tjóðskap, virkis- ella framleiðslustað, tá tað almenna keypir inn. Spurningarnir eru serliga viðkomandi tá lýst verður eftir tilboðum, innihaldi í útbjóðingartilfarinum, avgerð um tillutan av sáttmálanum og spurninginum um møguligt útboðskrav.

*Lýsing eftir tilboðum*
Tað er eingin ivi um, at tað hevði verið í stríð við Hoyvíkssáttmálan at lýst eftir føroyskum veitarum ella á annan hátt at givið ta fatan í lýsingini, at føroyskir veitarar hava ein fyrimun fram um íslendskar.

Tó kann tað ikki haldast, at Hoyvíkssáttmálin førir til nakað krav um, at útboð skulu lýsast í Íslandi eisini. Tað má vera upp til innkeyparan at meta, hvar tað er skilabest at lýsa, og tí ber framvegis til bert at lýsa í Føroyum, um innkeyparin ynskir hetta. Lýsingarnar kunnu eisini orðast á føroyskum, uttan at tað er í stríð við sáttmálan.

Um íslendskt felag bjóðar upp á uppgávuna ella biður um at vera undangóðkent, eigur tilboðið ella umbønin tó at verða viðgjørd á jøvnum føti við tilboðini ella umbønirnar frá føroyskum veitarum. Hetta er eisini galdandi, hóast tað bert er lýst í Føroyum og/ella lýsingin er orðað á føroyskum.

*Krøv í útbjóðingartilfarinum*
Tað hevði sum útgangsstøði verið í stríð við Hoyvíkssáttmálan at sett sum krav í útbjóðingartilfarinum, at veitarin skal verða skrásettur ella hava sítt virkisstað í Føroyum. Tó kann tað eftir umstøðunum vera loyvt at seta sum krav, at umboð fyri veitaran er staðsett í Føroyum, at veitarin hevur kunnleika til føroysk viðurskifti ella at uppgávan heilt ella partvíst verður útint í Føroyum, um hetta er neyðugt fyri at kunna veita tænastuna ella vøruna á fullgóðan hátt. Tað ber tó ikki til at seta slíkt krav, um tað ikki er neyðugt fyri at veita tænastuna á fullgóðan hátt, tí tá kann tað bera brá av mismuni vegna tjóðskap.

Sum útgangsstøði hevði tað eisini verið í stríð við sáttmálan at kravt ella sett sum metingarstøði, at arbeiðið verður útint av føroyskari arbeiðsmegi. Tað skal tó sambært

rundskrivi frá Vinnumálaráðnum[27] setast sum krav í sambandi við slíkar útbjóðingar, at sáttmálaviðurskiftini hjá møguligari útlendskari arbeiðsmegi ikki eru verri enn tey sáttmálaviðurskifti, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Viðvíkjandi tungumáli er spurningurin, um útbjóðarin kann orða útbjóðingartilfarið á føroyskum máli og seta krav um, at tilboðið skal vera orðað á føroyskum máli. Hóast einki beinleiðis verður sagt um henda spurning í íslandssáttmálanum, má roknast við, at útbjóðarin hevur rætt til at gera av, hvørjum máli útbjóðingartilfarið verður orðað á, og hvørjum máli tilboðið kann orðast á. Hetta er vanlig mannagongd í øðrum búskaparøkjum, eitt nú í ES. Tað eigur tó at vera tilskilað í lýsingini og/ella útbjóðingartilfarinum, hvat ella hvørji mál kunnu vera nýtt í tilboðnum.

[27] Rundskriv um arbeiðsklausular í sáttmálum um tænastu- og byggiarbeiðið hjá tí almenna, http://www.vmr.fo/Default.aspx?ID=6855&PID=10187&NewsID=1918

## Skjal 3: Útbjóðingar og tænastumenn

Í Ll. um tænastumenn landsins[28] er ásett í § 29:

***§ 29.** Verður tænastumaður loystur úr starvi, av tí at starvið verður tikið av vegna umlegging av fyrisitingini ella broyting av arbeiðslagnum, og tað ikki er gjørligt at ávísa honum annað starv, sum hann eftir §§ 11-12 hevur skyldu at taka av, fær hann sína higartil galdandi løn í 3 ár, tó ikki longur enn til tann fyri starvið galdandi fráfaringaraldur. Í hesum tíðarskeiði kemur hann undir reglurnar í §§ 11-12.*

Tænastumannasett starvsfólk eru í tí støðu, at í nógvum førum hava tey varug størv og kunnu størv teirra ikki uttan víðari flytast til privata geiran. Í § 29 er tilskilað, at tænastumenn skulu, um teir verða uppsagdir vegna umleggingar, fáa løn í trý ár.

Tó so, eru í fleiri førum umskipanar av tænastumannastørvum framdar við lóg, eitt nú tá Føroya Tele og Vága Floghavn vórðu løgd um til partafeløg. Í hesum førum varð lógarásett, at tænastumenn kundu ikki halda uppá, at starv teirra var niðurlagt og vórðu eisini semjur gjørdar millum tænastumennirnar og tað almenna um treytir við flyting av starvi til partafelag.

Tað skal hóast alt vera myndugleikanum greitt, at talan kann vera um ávísar kostnaðir um ein almennur myndugleiki hevur í hyggju at bjóða út eina uppgávu, sum verður røkt av einum tænastumanni. Sostatt skal hetta innganga sum eitt atlit tá myndugleikin skal taka støðu til eina kappingarútsetan.

[28] Ll. nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins við seinni broytingum